| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 962 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 26. oktober 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 235/23 – 263/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen (luttók bert í máli 263/23 )
Jón Kragesteen
Birita Baldvinsdóttir Iversen
Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 963<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 235/23 | 23/06081-2 | Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023 | 965 |
| 236/23 | 23/06145-1 | Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023 | 966 |
| 237/23 | 23/06243-1 | Tróndur Sigurðsson berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023 | 967 |
| 238/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 968 |
| 239/23 | 21/00586-3 | Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 658d, yviri við Strond 53, Tórshavn | 970 |
| 240/23 | 22/05165-2 | Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi | 975 |
| 241/23 | 23/01292-1 | Spælipláss til Miðstovnin | 978 |
| 242/23 | 23/05741-3 | Dagstovnurin á Argjum – Spælitorn í garðinum | 981 |
| 243/23 | 22/00328-1 | Frítíðarhús í Hesti – matr.nr. 101 og 10a | 983 |
| 244/23 | 23/05112-1 | Øki til tilfarsgoymslu | 986 |
| 245/23 | 20/04607-1 | Spælipláss í kommununi | 989 |
| 246/23 | 21/00684-1 | Brúgv í Havnardali | 993 |
| 247/23 | 22/00329-1 | Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a | 997 |
| 248/23 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 1003 |
| 249/23 | 23/03120-3 | Umsókn um sundurbýti av matr,nr, 996a, Tórshavn, og keyp av lendi hjá TK. | 1020 |
| 250/23 | 23/05757-1 | Umbøn um eykajáttan til konto 7110 Renovatión | 1022 |
| 251/23 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 1024 |
| 252/23 | 22/04583-1 | Skjótløðistøð til kommunal akfør | 1038 |
| 253/23 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 1041 |
| 254/23 | 21/00676-7 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn | 1045 |
| 255/23 | 23/04334-3 | Umsókn um broyting av byggisamtyktini soleiðis, at matr. nr. 132c, Kollafirði verður broytt frá D1-øki til sama øki sum matrikklarnir niðan fyri hava | 1049 |
| 256/23 | 23/05440-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini - áseting um minstu grundstykkjavídd til tvíhús í A1 økjum | 1051 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 257/23 | 23/05639-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri røktarheim á Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík | 1053 |
| 258/23 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 1055 |
| 259/23 | 22/00638-1 | Víðkan av Skansabryggjuni - útbygging norðureftir | 1074 |
| 260/23 | 22/07206-15 | Róðararfelagið Knørrur : Rokning fyri umprojektering av neysti í Álakeri | 1079 |
| 261/23 | 23/05027-2 | Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna | 1082 |
| 262/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 1088 |
| 263/23 | 23/03480-1 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. | 1090 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 965 |
| | Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 235/23 Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 235/23 | 23/06081-2 |

**Málslýsing**
Turið Horn hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 236/23 Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 236/23 | 23/06145-1 |

**Málslýsing**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jóhan Petur Johannesen, eru loknar.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 237/23 Tróndur Sigurðsson berst frá at møta á býráðsfundi 26. oktober 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 237/23 | 23/06243-1 |

**Málslýsing**
Tróndur Sigurðsson hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 238/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 119/23 | 23/00153-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 136/23 | 23/00153-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 195/23 | 23/00153-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 238/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 239/23 Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 658d, yviri við Strond 53, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 145/21 | 21/00586-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 22.06.2021 | 45/21 | 21/00586-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 172/21 | 21/00586-3 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 204/21 | 21/00586-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 281/23 | 21/00586-3 |
| 6 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 239/23 | 21/00586-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá sakførara at yvirtaka part av matr. nr. 658a til almennan veg sum atkomu til matr. nr. 658d, Tórshavn, umframt matr. nr. 658a og 658c, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Sakførari umboðandi eigararnar av matr. nr. 658d, Tórshavn, heitir í skrivi dagfest 3. februar 2021 á Tórshavnar kommunu um at yvirtaka vegin, sum er lagdur á matr. nr. 658a, Tórshavn, og sum er vegatkoma til ognirnar matr.nr. 658a, 658c og 658d.

Sakførarin vísir á, at ferðsluviðurskiftini í økinum hava verið ótolandi í nógv ár, og eitt nú hava fleiri sakarmál verið um atkomuna eftir vegnum, ið liggur á matr. nr. 658a.

Sakførarin vísir á, at tað var í semju millum allar táverandi eigarar av nevndu ognum, at Tórshavnar kommuna seinast í áttatiárunum lat gera vegatkomu til tær tríggjar ognirnar eftir matr nr. 692a og á matr. nr. 658a.

Við dómi eru eigararnir av matr. nr. 658a dømdir at viðurkenna, at eigararnir av matr. nr. 658d hava vegatgongd eftir matr. nr. 658a og kunnu nýta parkeringsøkið á matr. nr. 658 c.

Sakførarin vísir á, at løgreglan sigur seg ikki kunna gera nakað við viðurskiftini á staðnum, tí ein partur av vegnum liggur inni á privatari ogn hjá matr. nr. 658a.

- Eg fari tí at biðja um, at sjálvur vegurin, sum gongur millum sethúsini á 658d og 658a og tann tríkanturin av 658c, sum er nýttur sum parkeringspláss, sum hjálagda mynd vísir, verður yvirtikin av kommununi sum partur av felags vegi, soleiðis at vegatkoman hjá klientum mínum sum eigarar av matr. nr. 658d verður tryggjað, skrivar sakførarin í áheitan síni á Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur samskift við sakførara umboðandi eigararnar av matr. nr. 658a og lagt fram uppskot til loysn, sum inniber, at Tórshavnar kommuna yvirtekur lendið á matr. nr. 658a, sum liggur sum vegur í dag. Sakførarin hevur síðani boðað Tórshavnar kommunu á, at eigararnir ikki eru sinnaðir at taka undir við slíkari loysn.

Skal kommunan gerast eigari av lendinum, sum liggur sum vegur í dag, noyðist kommunan tískil at ognartaka lendið.

1881-lógin om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingsstder samt til offentlige skoler på Færøerne heimilar kommunustýrinum at ognartaka lendi til nýggjan veg ella víðkan av eldri vegi ella broyttari vegaføring í tann mun, hetta er almannagagnligt.

Ognartøka kann bert fara fram mótvegis fullum endurgjaldi. Er ikki semja um endurgjaldið, verða tvey metingarfólk av Føroya rætti biðin um at áseta støddina á endurgjaldinum.

Avgerðir um heimildargrundarlagið undir ognartøkum kunnu kærast til kærunevndina í lendismálum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
21_00586 Vídd av yvirtøku.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býarverkfrøðingurin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til, um kommunan skal fara undir eina tilgongd at ognartaka part av matr. nr. 658a, Tórshavn til vegatkomu til matr. nr. 658a, 658c og 658d og beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við at fara undir eina tilgongd at ognartaka part av matr. nr. 658a, Tórshavn til vegatkomu til matr. nr. 658a, 658c og 658d og beinir málið í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Vegaatkoman til matriklarnar 658a, 658d og 658c kann tryggjast við at ein 4 metur breiður geiri inni á matr. 658a, beint vestan fyri markið móti matr. 658d og 658c, sum gongur 6 metrar norður um markið millum 658c og 658d, verður gjørdur til veg.

Hetta gevur eina vídd á 75 m² sum krevst til vegin og umfatar ikki verandi stoypt undirlag, sum er á matr. 658a, men einans asfalterað / skervlagt øki.

Av tí at talan einans er um atkomu til í mesta lagi tríggjar matriklar er ikki tørvur á, at vendipláss verður gjørt.

Tørvur er á, at asfalterað verður innan alt ov langa tíð. Eisini er tørvur á, at avvanding verður skipað fyri alt vegastrekkið oman til vegin Yviri við Strond. Hetta eru átøk, sum innibera útreiðslur, sum kunnu haldast innan rakstrarjáttan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umrødda økið verður umlagt til veg og at tekniskar ábøtur á vegin verða gjørdar og fíggjaðar yvir rakstur.

**Tekniska nevnd 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini at fara undir eina ognartøkutilgongd í málinum umframt tilmælið frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang

**Ískoyti:** Eftir at býráðið hevði samtykt at fara undir eina ognartøkutilgongd í málinum, varð málið kært til Kærunevndina í lendismálum av eigaranum av lendinum, sum ætlanin var at ognartaka.

Eftir hesa viðgerð varð málið heimvíst til nýggja viðgerð hjá kommununi, tí Kærunevndin í lendismálum metti, at tað kundi vera ivi um, hvørt kærararnir vóru hoyrdir á ein nøktandi hátt, (j.nr. 21/00586-30).

"*Tá talan er um eina sera týðandi og inngrípandi avgerð, sum ein ognartøka má metast at vera, so má als eingin ivi vera um, at partarnir í málinum eru hoyrdir, og sostatt eru púra greiðir yvir hvat ætlanin hjá kommununi er at fremja. Partarnir mugu tí verða kunnaðir um ætlanina, soleiðis at partarnir undir viðgerðini kunnu fáa høvi til at gera viðmerkingar til tað um kommunan aætlar at taka avgerð um.*

*Kærunevndin í lendismálum avgjørdi at heimvísa hetta málið til nýggja viðgerð hjá Tórshavnar kommunu.*

*Avgerðin er grundað á, at mett verður ikki, at kommunan á nøktandi hátt hevur tryggjað sær, at partarnir vóru kunnaðir um ætlanina hjá kommununi at ognartaka 75 m2 til veg, burtur av matr.nr. 658a, Tórshavn.*", skrivar Kærunevndin í avgerð sínari.

Eftir avgerðina í Kærunevndini sendi umsitingin pørtunum í málinum nýtt hoyringsskriv, ið lýsti ætlanirnar hjá kommununi at ognartaka umleið 75 m² burtur av matr. nr. 658a til tess at tryggja nøktandi atkomu til ognirnar 658a, 658d og 658c, Tórshavn.

Í hoyringsskrivinum (j.nr. 21/00586-32) skrivar umsitingin m.a.: “*Kommununnar ætlan um ognartøku varð fráboðað tygum í skrivi 23. nov 2021. Eftir tað hava tygum kært kommununnar ætlan um ognartøku til Lendiskærunevndina í Føroya Kærustovni um manglandi hoyring. Føroya kærustovnur hevur mett, at tað er ivasamt um tygum hava verið hoyrd á nøktandi hátt og hevur sostatt heimvíst avgerðina hjá kommununi til nýggja viðgerð. Hetta tekur kommunan til eftirtektar og sendir tygum hervið ætlaðu ognartøkutilgongd til hoyringar.*

*Orsøkin til, at Tórshavnar kommuna fer undir eina ognartøku av hesum øki, er fyri at tryggja, at matr. nr. 658d, 658a og 658c, Tórshavn hava ótarnaða almenna vegaatkomu. Í dag er atkoman til matr. nr. 658c og 658d, Tórshavn, gjøgnum tykkara ogn, matr. nr. 658a, Tórshavn. Vegaatkoman verður tryggjað á tann hátt, at ein 4 metur breiður geiri inni á matr. nr. 658a, beint vestan fyri markið móti matr. nr. 658d og 658c, sum gongur 6 m norð um markið millum matr. nr. 658c og 658d, verður gjørdur til veg.*

*Hetta gevur eina vídd á 75 fermetrar, sum krevst til vegin og umfatar ikki verandi stoypt undirlag, sum er á matr. nr. 658a, Tórshavn, men einans asfalterað/skervlagt øki.*

*Tað er við heimild í § 1 í “Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022” at Tórshavnar kommuna fer undir at ognartaka lendi burtur av ogn tykkara.*

*§ 1 í omanfyrinevndu lóg er soljóðandi: ”§ 1. Naar en Kommunalbestyrelse finder enten Anlæggelsen af en ny offentlig Vei eller Udvidelsen af en ældre saadan Vei eller en forandret Retning af samme i den Grad fornøden, at det almene Vel maa ansees at fordre slige Anlæg, skulle vedkommende Grundbesiddere være pligtige til imod fuldstændig Erstatning at afstaa det nødvendige Jordareal.*“

Í svari sínum (j.nr. 21/00586-33) skrivar advokaturin hjá eigarunum av lendinum m.a.:

“*Klientir míni eiga matr. nr. 658a og 658c og ynskja ikki, at kommunan ognartekur av teirra ogn til almennan veg. So er bara matr. nr. 658d eftir, sum kommunan vil tilgóðarsíggja.*

*Matr. nr. 658d, 658a og 658c hava ótarnaða vegatkomu. Harvið er óneyðugt at ognartaka økið av matr. nr. 658a.*

*<u>Matr. nr. 658a</u>, sum mínir klientar eiga, hevur ótarnaða vegatkomu, tí vegatkoman er á egnum matr. nr.*

*<u>Matr. nr. 658c</u> sum er eitt jarðarstykki, sum mínir klientar eiga, hevur ikki tørv á vegatkomu. Matr. nr. 658c hevur tó ótarnaða vegatkomu umvegis teirra egna matr. nr. 658a og eisini inn frá ringvegum. Tað sæst m.a. á viðfestu mynd, sum varð latin saman við hoyringsskrivinum.*

*Um klientar mínir ynskja at tryggja matr. nr. 658c vegatgongd eftir matr. nr. 658a í sambandi við møguliga sølu av matr. nr. 658 c, so stendur tað mínum klientum frítt fyri at tryggja atkomu umvegis matr. nr. 658a. Ognartøka er ikki neyðug fyri at tryggja klientum mínum atgongd til teirra egnu ogn.*”, skrivar advokaturin.

Advokaturin leggur afturat, at: “*Tað er ikki haldgott grundarlag fyri at ognartaka privata ogn, at tað er fyri at tryggja einum húski á matr. nr. 658d betri ferðsluviðurskifti. Ognartøka skal verða neyðug og fyri at tæna “almenvellet.” Eitt húskið, sum í forvegin hevur ferðslurætt sum ognartøkan skal tryggja, er ikki almenvellet.*

*Eg havi eisini fyrr gjørt vart við, at hetta er ikki eitt mál, sum tað liggur á Tórshavnar kommunu at blanda seg upp í við at renna ørindi fyri eigarnar av matr. nr. 658d og royna at kroysta eigararnar av matr. nr. 658a og 658c.*”

Advokaturin hjá eigarunum av grannaognini 658d hevur eisini gjørt viðmerkingar til hoyringsskrivið at ognartaka burtur av matr. nr. 658a (j.nr. 21/00586-38). Hann tekur undir við ognartøkuni og endurtekur, at ognartøkan er neyðug, um vegurin skal gerast partur av almenna vegakrevinum. Hann vísir eisini á, at tað

er kommunan, sum upprunaliga hevur gjørt vegin, sum ætlanin nú er at ognartaka, men at vegurin ongantíð er frámerktur sum vegur, og at hetta helst er eitt mistak.

Umsitingin skal viðmerkja, at tað er rætt, sum advokaturin fyri eigararnar av lendinum, ið ætlanin er at ognartaka, vísir á, at allar ognir kring lendið, ið ætlanin er at ognartaka, hava atkomu í dag. Eigarin av matr. nr. 658d hevur í Føroya Rætti fingið dóm fyri, at hann hevur hevdsvunnan rætt at koyra umvegis matr. nr. 658a til og frá síni egnu ogn.

Hóast hetta, so er hetta pettið av vegnum ikki partur av almenna vegakervinum, og við ognartøkuni vil kommunan tryggja sær, at allar ognir eisini í framtíðini hava vegaatkomu gjøgnum almenna vegakervið, og hetta kann bert gerast, um partur av matr. nr. 658a verður ognartikin og lagdur afturat almenna vegakervinum.

Tí verður mælt til at halda fast um ætlaðu ognartøkuna.

**Tilmæli:** Tekniski stjóri og deildarleiðin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við ætlanini at ognartaka uml. 75 m² burtur av matr. nr. 658a til at leggja út til almennan veg, smb. kortskjali í j.nr. 21/00586-32.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum blonkum og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóan Petur Eyðfinnur Johannsen, Birita Baldvinsdótir, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddi: Annika Olsen.

## 240/23 Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 199/22 | 22/05165-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 167/23 | 22/05165-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 264/23 | 22/05165-2 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 240/23 | 22/05165-2 |
| 5 Býráðsfundur | | | 22/05165-2 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á vongskúri og betri arbeiðsumstøðum.

**Lýsing av málinum**
Tað hevur verið ynski hjá stovninum í fleiri ár um at fáa betri umstøður til vognarnar, sum aftur er við til at gera arbeiðsumstøðurnar á stovninum betri.

Bygningsdeildin hevur fingið til vega uppskot til loysn við nýggjum vognskúri. Talan er um útbygging av stovninum og avleidd arbeiði uppá tekjuna og í túninum, sí skjal.

Arbeiðið er mett so mikið stórt, at tað hóskar betri til at verða framt sum íløga heldur enn av rakstri. Kostnaðarmetingin uppá HVÚ er uml. 1,6 mió, harumframt koma útreiðslur til prosjektering, ókent og mvg. Mett verður møguligt at fíggja arbeiðið av kontu 3175 Barnaansing (løgur).

Mett verður, at arbeiðið kann bjóðast út til 4-6 smærri handverkarafyritøkur.

Skotið verður upp at bjóða arbeiðið út, og at úrslitið av lisitatiónini verður latið mentamálanevndini aftur til støðutakan um arbeiðstøkusáttmála og fígging, sum eftirfylgjandi fer fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at bjóða út arbeiðið at gera vognskúr v.m. til Býlingshúsið á Ternuryggi og at leggja lisitatiónsúrslitið aftur fyri nevnd til støðutakan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Lisitatión fyri vognrúmi v.m. var tann 04.08.2023. Fimm arbeiðstakarar vórðu bodnir at bjóða, og fýra lótu tilboð inn. Lægsta tilboðið átti Sp/f JEP Smíð kr. 2.111.287,00 (HVÚ). Aftrat kemur ókent 10%, fakeftirlit og byggileiðsla, tillaging av lásaskipan, endareingerðing og kommunalt mvg, tilsamans kr. 2.731.565.

Lisitatiónin umfataði eisini at skifta tekju á verandi bygningi, hettar verður fíggja umvegis rakstur av kontu 6110.

À kontu 3175 Barnaansing LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum eru tøkar kr. 2,5 mió til byggingina. Restupphæddin og tekjan o.a. verður fíggjað av rakstri kontu 6110.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá JEP Smíð, og í hesum sambandi at flyta kr. 2,5 mió. kr. av løgukarmi LK31015 Tillagingar á dagsovnaøkinum til nýggja lønarkontu Býlingshúsið á Ternuryggi, og at írestandi játtanin verður fíggjað av rakstri kontu 6110. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 241/23 Spælipláss til Miðstovnin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 50/23 | 23/01292-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.05.2023 | 94/23 | 23/01292-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 170/23 | 23/01292-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 262/23 | 23/01292-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 241/23 | 23/01292-1 |
| 6 Býráðsfundur | | | 23/01292-1 |

**Upprunin til málið**
Gerast skal spælipláss til dagstovnin Miðstovnin.

**Lýsing av málinum**
Umbyggingin av bygninginum í Kongagøtu til Miðstovnin er liðug. Aftrat Kongagøtu eru børn í gamla realskúlanum og húsini hjá Frk. Cohr verða eisini brúkt.

Stórur tørvur er á at skipa og gera stovninum vælvirkandi spælipláss, sum eisini brúkar og tekur atlit at serstaka umhvørvinum.

Hjálagt er uppskot frá byggi- og býarskipanardeildini til skipan av økinum, og hvussu tað viðvíkjandi umhvørvi, hentleikum o.ø. kundi sæð út. Sambært hesum er talan bæði um økið við Tróndargøtu/Kongagøtu og økið við gamla realskúlan/gamla kommunuskúlagarðin.

Týdningarmikið er, at leiðsla og starvsfólk á stovninum verða tikin við í ætlanina soleiðis, at eisini tey námsfrøðiligu atlitini verða tikin við.

Skotið verður upp, at umsitingin saman við stovninum ger eitt fullfíggjað uppskot bæði í mun til skipan av økinum og við spæliútgerð v.m.. Aftrat skal kostnaðarmeting og tíðarætlan fáast til vega.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til, at umsitingin saman við stovninum ger uppskot til spælipláss, harundir at gera kostnaðarmeting og tíðarætlan at leggja aftur fyri nevndina á fundinum í apríl.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Við støði í hugskotsskitsuni hjá Býarskipanardeildini, sum varð løgd fyri nevndini 8. mars, eru ymsu spæliøkini og atknýttar høvuðsfunktiónir løgd fyri leiðslu og starvsfólk á stovninum. Semja er um, at hetta er eitt gott grundarlag at arbeiða víðari við.

Umsitingin mælir til at seta ein uttanhýsis ráðgevara, sum skal útgreina ynskir í eini byggiskrá og standa fyri útboðnum sum heildararbeiðstøka. Ásannast má, at talan er ikki bert um eitt spælipláss til ein dagstovn, men er uttanfyri vanligu upplatingartíðirnar eisini at síggja sum hentleiki til miðbýin saman við spæliøkinum í Grasagarði. Hetta setir krøv bæði um dygd og funktión.

Tá útbjóðingartilfarið er klárt, verður tað sent í avmarkað útboð millum heildararbeiðstakarar, sum hava tekniskar og fakligar førleikar at byggja spæliplássið í tráð við galdandi reglur og normar.

Bygningsdeildin hevur royndir við trimum ella fýra arbeiðstakarum, sum hava samband við útlendskar veitarar av góðskuútgerð til spælipláss, og kunnu koma við kvalifiseraðum tilboðið uppá loysn, útgerð, arbeiði og prís.

Ráðgevin verður eisini settur til at hava byggileiðslu og eftirlit við sjálvum arbeiðnum.

<u>Kostnaðarmeting</u>
Bygningsdeildin hevur við støði í omanfyri standandi gjørt eina varisliga kostnaðarmeting, sum byggir á fermetraprísin á øðrum spæliplássum, sum nýliga eru gjørd í Tórshavnar kommunu. Kostnaðarmetingin liggur um kr. 3-3,5 mió og fevnir tá um útboð, ráðgeving/eftirlit, prosjektering, annleggsarbeiði, belegningar og leikur til økini (umframt mvg og byggiharraútreiðslur):

- Økið 1-3 ára gomul
- Økið 3-6 ára gomul
- Súkklubreyt
- Økið til útihugna

<u>Tíðarmeting</u>
Útbjóðingtilgongd og tilboðstíðarskeið tekur væntandi umleið tveir mánaðir. Sáttmáli kann sostatt í fyrsta lagi gerast um mánaðarskiftið august/september 2023, um Tórshavnar kommuna tekur av einum av innkomnu tilboðunum.

Arbeiðið kann væntast at taka 7-8 mánaðir í effektivari arbeiðstíð. Royndirnar eru, at tað er sera trupult at leggja síðstu hond á arbeiðir við spæliplássum (fallundirlag, sandur og grøn økir) um veturin. Tí má roknast við at arbeiðið í fyrsta lagi verður heilt liðugt um 1. juni 2024.

Í løguætlanin eru kr. 1 mió settar av til útiøki løgukonta 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, ið kundi verið brúkt til endamálið, har restfígging verður játtað seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja:

- at fáa til vega útbjóðingartilfar,
- at bjóða arbeiðið út millum tríggjar arbeiðstakarar í heildararbeiðstøku, og at úrslitið verður lagt aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 04. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygningsdeildin hevur gjørt avtalu við EYA arkitektar um at fáa til vega útbjóðingartilfar. Ein samlað verkætlan er mett til uml. 3 mió.

Fígging er ikki tøk til fullfíggjaða verkætlan. Fyri at fáa gongd á verkætlanina verður mælt til, at verkætlanin verður framd stígvíst so hvørt sum fígging fæst til vega. Á løgukarmi 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, eru tøkar kr. 1 mió. Víst verður tó eisini til mál 23/05741 um tørv á útbúnaði til spælipláss í Dagstovninum á Argjum, har skotið verður upp at býta játtanina soleiðis, at hálv millión verður játtað til spæliplássið til Miðstovnin og hálv millión til spæliplássið hjá Dagstovninum á Argjum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at játta kr. 500.000 av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Miðstovninum.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Súsanna Olsen, taka undir við tilmælinum við tí broyting, at játtaðar verða kr. 1 mió av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, og kr. 0,5 mió av løgukarmi LK31017 Dagføring frítíðarskúlar til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Miðstovninum.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at fíggja spæliplássið av løgukontu 8375 Rakstrargøgn.

Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 242/23 Dagstovnurin á Argjum – Spælitorn í garðinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 171/23 | 23/05741-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 263/23 | 23/05741-3 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 242/23 | 23/05741-3 |
| 4 Býráðsfundur | | | 23/05741-3 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á nýggjum spælitorni.

**Lýsing av málinum**
Eftir eina eftirlitskanning frá Nordisk Legegpladsinstitut í summar varð avgjørt at taka niður spælitornið í garðinum niður, tí at tað var í so ringum standi, at tað var ikki ráðiligt at lata børn spæla í tí. Stórur tørvur er á at fáa eitt nýtt spælitorn, tí nógv annað er ikki í garðinum.

Á løgukarmi 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, eru tøkar kr. 1 mió. Víst verður tó til mál nr. 23/01292 um spæliøkið hjá Miðstovninum, har skotið verður upp at býta játtanina soleiðis, at hálv millión verður játtað til útbúnað á spæliplássinum í dagstovninum á Argjum og hálv millión til spæliplássið hjá Miðstovninum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 982<br>Formansins merki: |
|---|---|

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 3175 | LK31016 | Dagstovnar uttanumøk |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6110 | Uttanumøki | Dagstovnuri á Argjum | |

| **Upphædd** |
|---|
| 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at játta kr. 500.000 av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Dagstovninum á Argjum.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Súsanna Olsen, taka undir við tilmælinum við tí broyting, at játtaðar verða kr. 0,5 mió av løgukarmi 31017 Dagføring frítíðarskúlar.
Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at fíggja spæliplássið av løgukontu 8375 Rakstrargøgn.
Málið at beina í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálaevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 243/23 Frítíðarhús í Hesti – matr.nr. 101 og 10a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 24/22 | 22/00328-1 |
| 2 Hest/Koltursnevndin | 15.03.2022 | 1/22 | 22/00328-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 33/22 | 22/00328-1 |
| 4 Hest/Koltursnevndin | 27.09.2022 | 6/22 | 22/00328-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 125/23 | 22/00328-1 |
| 6 Hest/Koltursnevndin | 24.10.2023 | 3/23 | 22/00328-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 243/23 | 22/00328-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu árini er fólkatalið í Hesti støðugt minkað, helst bæði grundað á sambandið til oynna, men eisini grundað á tilboðini í oynni, umframt at lítið og einki arbeiðsvirksemi er í oynni.

Henda tilgongdin hevur havt við sær, at fleiri og fleiri síggja møguleikar í at menna oynna til eina ferðavinnuoyggj. Eisini vísir tað seg, at fleiri og fleiri ynskja at ogna sær frítíðarhús í oynni.

Hesi hugskot og ynskir ynskir kommunan at stimbra undir, og tí verður farið undir at bjóða tveir matrikklar út til at byggja frítíðarhús á.

**Lýsing av málinum**
Talan er um matr. nr. 101, sum í byggisamtyktini er lagt út til frítíðarhús, og so er tað partur av matr. nr. 10a, sum liggur niðri við havnalagið, men sum enn ikki er broytt til bygging av frítíðarhúsum. Báðir matrikklarnir eru ogn kommunurnar. Sí skjal nr. 22/00328-2, sum sýnir økini, sum ætlanin er at bjóða út.

Útbjóðingarskrivið/ini eru enn ikki gjørd, og er tað ikki avgjørt, hvussu verkætlanin skal bjóðast út ella hvørjar treytir skulu setast teimum sum bjóða. Tað er somuleiðis hugsandi, at økini skulu hava ymiskar treytir, so tað ger tað møguligt, at nakað verður bygt liðugt at leiga út ella selja og annað verður selt privatum at byggja síni egnu frítíðarhús á.
Tað eru fleiri viðurskiftir, sum eiga at verða umrødd í hesi tilgongdini, og fer umsitingin at seta seg í samband við umboð úr Hesti til at umrøða verkætlanina, áðrenn endaliga útbjóðingarskrivið verður lagt út alment at bjóða uppá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstaka byggisamtyktin fyri Hest
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/04429 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest
21/02256 Broyting av byggisamtykt fyri Hest

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00328-2 Summarhúsøki í Hesti

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar at bjóða matriklarnar út til bygging av frítíðarhúsum og at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt**.**

**Hest/Koltursnevndin 15. mars 2022:** Býarskipanardeildin framleiðir útbjóðingartilfar og leggur tað fyri nevndina aftur til kunningar/viðmerkingar.

**Hest/Koltursnevndin 27. september 2022:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Á heysti 2022 vórðu tvey grundøki í Hesti boðin út til bygging av frítíðarhúsum, eitt norðan fyri bygdina og eitt á havnarøkinum. Tá freistin at bjóða var farin, tann 16. januar kl. 12, vóru eingi boð innkomin.

Hestfólk ynskja enn, at frítíðarhús verða gjørd í bygdini. Á fundi í staðbundnu nevndini varð víst á, at ynski var, at kommunan bjóðar økini út enn einaferð, men at størri dentur verður lagdur á, at talan kann vera um 'vetrarhús' heldur enn summarhús/frítíðarhús.

Somuleiðis verður mett, at norðara stykkið í bygdini eigur at verða boðið út soleiðis, at borgarar kunnu keypa sær eitt minni stykkið at byggja sær eini frítíðarhús á. Hetta merkir, at umsitingin má skipað økið í minni stykkir, sum verða knýtt saman við gøtum, og har borarar kunnu byggja sær sítt egna frítíðarhús á.

Ynskiligt er, at branda frítíðarhúsini sum vetrarhús – hugnalig hús til køldu og myrku vetrarnar, við potti, bálstaði og øðrum vetrarvirksemi. Vit búgva í einum vetrarbýi/landi, og vit eiga at royna at gera býin og bygdirnar virknar, eisini um veturin. Summarið hendir virksemið av sær sjálvum, og við tí fráflyting, sum er í oynni, hevði eitt slíkt øki givið eitt positivt íkast til lívið í bygdini – alt árið runt.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til:
- at bjóða norðara økið út í smærri grundstykkjum
- at bjóða økið á havnaøkinum út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður
- at økini verða bjóðað út sum vetrarhús
  og at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Hest/Koltursnevndin 24. oktober 2023:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 244/23 Øki til tilfarsgoymslu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 154/23 | 23/05112-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 266/23 | 23/05112-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 244/23 | 23/05112-1 |

**Upprunin til málið**
Ynski er at fáa ágóðan av tilfari, ið kemur burturúr tunlinum, so tað kann brúkast til nýgerð og hald av lendisgøtum.
Talan er um tilfar at byggja gøtur upp við og eisini um royðutilfar, sum kann knúsast til at gera ovasta slitlagið á gøturnar við.

**Lýsing av málinum**
Ynski er at fáa ágóðan av tilfari, ið kemur burturúr tunlinum, so tað kann brúkast til nýgerð og hald av lendisgøtum. Talan er bæði um tilfar til uppbygging av gøtum, men eisini um royðutilfar, sum er serstakliga væl hóskandi til slitlag, bæði í mun til haldføri og útsjónd.
Í longri tíðarskeið hevur royðutilfar verið mangulvøra, so tað er sera viðkomandi at nýta høvið at fáa gagnnýtt hetta tilfarið, sum eisini hevur við sær at veiting av tilfari til gøtubygging verður bíligari.
Skal hetta lata seg gera, er neyðugt at finna staðsetingar til goymslu av tilfarinum, so tað kann koyrast burtur frá tunnilsøkinum, so hvørt sum tað verður borað/sprongt.
Articon, sum er høvuðsarbeiðstakari av tunnilsverkætlanini vísir á, at grundað á tepru tíðarætlanina fyri tunnilsverkætlanina verður mælt til, at grótið verður knúst á endaligu staðsetingini.

Umsitingin hevur skotið upp, at langtíðargoymsla verður funnin til tilfar til lendisgøtur, *sí skjal jnr. 23/05112-2 uppskot til staðseting av tilfarsgoymslu.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nøgdirnar, ið tunnilsarbeiðstakarin metir vera av royðu eru uml 16-30.000 m$^{3}$.. Tó er ivasamt, um talan einans er um royðu, ella eisini um sandstein. Tó verður mett, at tilfarið er væl hóskandi til slitlag á lendisgøturnar.

Arbeiðstakarin hevur boðað frá, at ætlanin var at brúka royðu/sandsteinstilfarið til ljóðmúrin millum veg og byggilendi, men at Tórshavnar kommuna kann fáa tilfarið koyrt á goymslu, um tað kann koyrast burtur, so hvørt sum tað verður koyrt úr tunlinum.

Mett verður, at tilfarið kann koyrast á langtíðargoymslu, og har verða knúst.
Um roknað verður við at gera/umvæla 2 km gøtur árliga, verður mett, at tørvur er á uml 2.400 m$^{3}$. Hetta svarar til uml 10% av mettu royðuni, sum er í tunlinum.
Mettur kostnaður fyri at skipa langtíðargoymsluna, at koyra tilfar til langtíðargoymslu og at knúsa royðutilfarið er 600.000,- kr.
Tunnilsarbeiðstakarin er komin til royðulindina, og er tí týdningarmikið, at økið sum skjótast verður sett av til tilfarsgoymslu, um lendisgøtur skulu hava nyttu av hesum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Til langtíðargoymslu verður víst á:
Økið í Villingardali, har tyrvingarplássið var.

Økið er festijørð, ið áður er brúkt til tyrvingarpláss. Loyvi skal fáast frá Búnaðarstovuni og festara til virksemið.
Harumframt verður víst á økið við vindmyllulundina í Flatnahaga.
Tórshavnar kommuna eigur Flatnahaga, og hevur ræðisrætt á økinum. Loyvi skal fáast frá náttúrufriðingarmyndugleikum til virksemið.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild hevur ongar viðmerkingar.
Stjórnardeildin ger vart við, at avtala má gerast við Búnaðarstovuna og festara, um goymsluøkið skal vera í Húsahaga.
Stjórnardeildin metir, at økið í Flatnahaga er einfaldari at taka í brúk. Avtala um Flatnahaga er gjørd 19.09.2023, har kommunan treytar sær rættin at taka økið burturúr avtaluni til egið ella alment brúk.

**Skjøl**
j.nr 23/05112-2 uppskot til staðseting av tilfarsgoymslu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62056 | Náttúruøkið í Dalinum Langa | 6275 | | | Øki til tilfarsgoymslu til lendisgøtur | 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 600.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og Býarárkitekturin mæla til:

1. at nevndu staðsetingar verða brúktar til tilfarsgoymslu til framtíðar gerð av lendisgøtum, tá avtala er fingin við avvarðandi partar, og friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til virksemið.
2. at játta kr. 600.000,- av LK62056 náttúruøkið í Dalinum langa á nýggja kontu kt 6275 "Øki til tilfarsgoymslu til lendisgøtur".
3. At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 245/23 Spælipláss í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 341/20 | 20/04607-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 253/20 | 20/04607-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 358/20 | 20/04607-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 318/20 | 20/04607-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 49/21 | 20/04607-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 58/21 | 20/04607-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 95/21 | 20/04607-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 152/23 | 20/04607-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 267/23 | 20/04607-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 245/23 | 20/04607-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur avgjørt at játta 2 mió. kr. av eykajáttanini fyri oktober til spælipláss í kommununi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ì sambandi við at heildarætlan fyri Gundadal hevur verið í umbúnað, sí mál nr. 18/03453 Skipan av Gundadali, hevur tað verið lagt upp til, at tvey økir verða løgd av til rørslu og spæl, umframt torgið frammanfyri/sunnanfyri Tórsvøll.

- Annað spælipláss verður lýst sum eitt eitt náttúruspælipláss og er staðsett í økinum norðanfyri ovara vøll. Sí j.nr. 20/04607-3 Náttúrukent spælipláss norðanfyri ovara vøll.
- Somuleiðis verður økið millum Tórsvøll og Høllina á Hálsi lagt av til stórar rørslur, parkour, free running v.m. Sí j.nr. 20/04607-4, Stórar rørslur ml. Tórsvøll og høllina á Hálsi.

Myndirnar lýsa í stórum trekkum hvat ætlanin er at fremja á hesum økjum til gagn fyri allar borgarar í kommununi, staðsett í Gundadali, sum hvønn dag savnar hópin av borgarum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heildarætlanin fyri Gundadal er enn ikki endaliga samtykt, men er ætlanin at gera smáu tillagingarnar í ætlanini fyrst í 2021 fyri síðani at leggja ætlanina fyri avvarðandi nevndir og býráð.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03453 Skipan av Gundadali
20/04581 Tórsvøllur Torg

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at eykajáttanin áljóðandi 2 mió. kr. verður bókað á konto 6275, á nýggja verkætlan "Spælipláss og onnur átøk í Gundadali", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ein foreldrabólkur at børnum í frítíðarskúlanum í Batmintonhøllini hevur av sínum eintingum arbeitt við at skaffa tvey tilboð inn til gerð av einum spæliplássi í økinum norðan fyri ovara vøll. Sí skjal j. nr. 20/04607-11, tilboð_Innsport_Batmintonhøllin spælipláss og j. nr. 20/04607-12_Prull_Spæliplássið í Gundadali.

Umsitingin arbeiðir við at kanna tilboðini í mun til góðskutrygging og býarskipanarliga í mun til heildarætlanina í Gundadali, umframt í mun til ynskini hjá foreldrunum, frítíðarskúlanum og Børn og ung.

Heildarætlanin fyri Gundadal lýsir spæliplássið sum eitt náttúruspælipláss, sum umframt at lúka tørvin hjá frítíðarskúlanum, eisini skal kunna virka sum eitt alment spælipláss, har børn í øllum aldri skulu kunna nýta, t.d. tá fótbóltsdystir eru á ovara vølli.

Játtan áljóðandi 2 mió. kr. er tøk á konto 6275, L62044, Spælipláss í kommununi, til verkætlanina.

**Skjøl**
Journal nr. 20/04607-11, Tilboð_Innsport_Badmintonhøllin spælipláss
Journal nr. 20/04607-12, Tilboð_Prull_ Spæliplássið í Gundadali

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at halda fram við spælipláss verkætlanini, at umsitingin setir arbeiðið í gongd at fíggja av kt. 6275, L62044, Spælipláss í kommununi og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í desember 2020 varð samtykt at bóka eina eykajáttan áljóðandi kr. 2 mió. á konto 6275, har henda upphædd skuldi deilast út á tvær verkætlanir:

1. Spælipláss á Glaðsheyggi (j.nr.21/046227)
2. Spælipláss og onnur átøk í Gundadali, sum síðani hevur fingið arbeiðsheitið "Náttúrukent spælipláss í Gundadali" (j.nr.20/04607)

Verkætlanin, Spælipláss á Glaðsheyggi, varð boðin út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar, Sp/f Innspark og donsku fyritøkuna Uniqa.
Uniqa hevði lægsta tilboðið á kr. 864.458,75 (v.mvg) og vann arbeiðstøkuna

Ein eykaveiting varð gjørd í hesi verkætlanini áljóðandi: 24.012,50 (v/mvg) fyri lendisarbeiði í økinum.

Verkætlanin "Náttúrukent spælipláss í Gundadali" varð eisini boðin út, sum avmarkað útboð til tveir innbodnar arbeiðstakarar, Sp/f Prull og Sp/f Innspark við nágreinaðum nøgdarlista til tveir veitarar, har ætlanin var at gera eitt alment spælipláss aftan fyri og oman fyri Tennisvøllin í Gundadali.

Sp/f Innspark hevði lægsta boðið, og skrivaði 25. mars 2022 undir arbeiðstøkusáttmála við einum arbeiðstøkutilboði áljóðandi kr. 1.187.100 u/mvg.

Ymsar seinkingar vóru í verkætlanini í Gundadali, og eykaveitingar og avtaluseðlar vórðu gjørdir á kr. 103.139 (v/kmvg), fyri lutir, sum ikki vóru umbidnir í nøgdarlistanum, so sum t.d. brekking av hellu, eyka lendisdren o.a.

Harumframt er prosjektløn trekt av samlaðu játtanini.

Kontoin er í troti við kr. 239.025.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | L62044 | Spælipláss í kommununi | |

| **Upphædd** |
|---|
| 239.025 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 239.025 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2020/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62044, Spælipláss í kommununi og at flyta trotið á kr. 239.025 á konto 6275 LK62999, Fríðkan av býnum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri rætting, at upphæddin er kr. 201.779. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 246/23 Brúgv í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 48/21 | 21/00684-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 59/21 | 21/00684-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 96/21 | 21/00684-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 109/22 | 21/00684-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 152/22 | 21/00684-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 185/22 | 21/00684-1 |
| 7 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 145/22 | 21/00684-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 151/23 | 21/00684-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 268/23 | 21/00684-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 246/23 | 21/00684-1 |

**Upprunin til málið**
Í des. 2018 varð frílendisætlanin fyri Havnardal gjørd av Ósbjørn Jacobsen Arkitektum. Ætlanin legði upp til at fremja ymisk átøk hvørt eftir annað. Sí j.nr. 21/00684-4, Havnadalur Frílendisætlan Desember 2018_Ósbjørn Jacobsen Ark.

Í 2019 vóru nøkur av átøkunum framd. Hesi vóru:

1. *Nýggj gróðurseting, sum styðjar uppundir verandi viðarlund, og sum samstundis virðir serstaka landslagið í dalinum.*
2. *Víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum.*
3. *Fleiri benkur fram við gøtunum*

Sambært ætlanini er næsta átak, ið skal raðfestast, átak 4

4. *Lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum, við at gera smáar timburbrúgvar.*

**Lýsing av málinum**
Grøna økið og viðarlundin í Havnardali er eitt fríøki, ið verður dagliga nýtt av mongum. Sandá rennur ígjøgnum økið, og er hon samlandi fyri fríluftsvirksemið í Havnardali.

Sum nú er, eru gonguleiðir lagdar inn í lendið báðu megin áarbakkan, men ongar gongubrúgvar eru gjørdar yvir um ánna, sum ger tað torført og til tíðir vandamikið at koma sær yvirum.

Sambært frílendisætlanini hevur júst hetta sambandið yvir um ánna eisini ein berandi leiklut í upplivingini av staðnum.

Roknast kann við, at hetta fríøkið fer at draga munandi fleiri fólk at nýta økið komandi árini í tráð við at býurin veksur, og at økið millum Horna verður bygt.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt at gjørdar verða tríggjar brúgvar í økinum. Sí j.nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnadali01, umframt j.nr. 21/00684-3, Sniðdømi, Ósbjørn Jacobsen 2018.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í D1 økið í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, lagt av til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tilíkt.

Umframt at økið er innanfyri friðingarlinjuna við Sandá og skal Náttúrufriðingarmyndugleikin so statt hoyrast og geva loyvi til brúgvarnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Havnardalur – fríøkið, Journal nr. 17/02248

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Journal nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnardali01
Journal nr. 21/00684-3, Sniðdømi_Ósbjørn Jacobsen2018
Journal nr. 21/00684-4, Havnardalur Frílendisætlan, Desember 2018_ Ósbjørn Jacobsen Ark.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at farið verður undir at gera brúgvarnar, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av konto 6275, L0001, Løgukarmur fyri árið, á konto L62033, Havnardalur – fríøkið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani 2018 hevur Tórshavnar kommuna gjørt almennar lendisgøtur báðumegin áarbakkan í fríøkinum í Havnardali. Hetta er bæði inni á lendinum eystaru megin ánna, sum kommunan eigur, og eisini inni á lendinum vestaru megin hjá festaranum á Velbastað, Dánjal Paula í Búðini. Hesar lendisgøturnar eru gjørdar sambært frílendisætlanini fyri Havnardal, sum býráðið samtykti í 2018.

Ein partur av hesum ætlaða lendisgøtuteininum er í gerð nú, og skal hesin eftir ætlan knýta gøturnar og brúgvarnar í økinum saman í ein samlaðan kring-gongutein.

Festarin sigur, at ongin greið avtala er gjørd við seg í sambandi við at Kommunan fór í gongd við at gera lendisgøtur á festijørðini hjá bóndanum í 2018.
Hann sigur m.a., at hann fær ikki brúkt lendið hjá sær í Havnardali til seyð um fólk ganga túr við hundi á økinum hjá sær, har einki hegn er sett upp.

Hann krevur tískil, at um kommunan framhaldandi ynskir at sleppa at brúka hendan partin av festijørðini til kommunala lendisgøtu, og um arbeiðið við gøtuni, sum nú er í gerð. skal gerast liðugt, so skal ein brúksavtala gerast partanna millum.

Bóndin góðtekur sostatt, at kommunan framhaldandi nýtir lendið sum almenna gonguleið, undir hesum treytum:

1. At kommunan áðrenn 1. oktober 2022 fráhegnar økið við almennu lendisgøtuni, og sjálv heftir fyri kostnaðin av hegninum umframt at hevur ábyrgd av hesum hegninum framyvir.

   Við hesum missir bóndin 26.746 fermetrar av síni festijørð til almenna nýtslu.
   Sí kortskjal: *Almenn gøtuskipan á festijørð í Havnardali*, journal nr. 21/00684.22

2. Og sum endurgjald fyri mist bit, skal kommunan veita 1000 m av øðrum hegni. Hetta hegnið setir bóndin sjálvur upp longri niðri í Havnardali, har nógv fólk eisini eru farin at nýta økið at ganga í.

Sí skjal: *Brúksavtala_Lendi til gøtu á festijørð 22april 2022*, journal nr. 21/00684-23

Býarskipanardeildin metir, saman við Løgdeildini, at hendan brúksavtalan er ein rímilig loysn fyri allar partar í málinum, og skotið verður upp at brúksavtalan skal standa við í 20 ár.

Sjálvur kostnaðurin at fráhegna lendisgøturnar í Havnardali verður á leið kr. 300.000, íroknað arbeiðstøku og tilfar.

Og kostnaðurin fyri hegnið, sum skal latast bóndanum sum endurgjald fyri mist bit, er kr. 70.000.

Umsitingin metir, at kostnaðurin av hesum tilsamans verður kr. 450.000, íroknað óvæntaðar útreiðslur og kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta treytirnar í brúksavtaluni um lendisgøturnar á festijørð í Havnardali, at játta kr. 450.000 av konto LK62997, Lendisgøtur á konto L62033, Havnardalur – fríøkið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í 2021 var 1 mió sett av til at byggja timburbrúgvar og at menna gøtuskipanina í fríøkinum Havnardali. Hendan verkætlanin var ein liður í yvirskipaðu menningarætlanini fyri fríøkið úti í Havnardali, sum Tórshavnar Kommuna fór undir í 2018.

Brúgvarnar vórðu lidnar og handaðar kommununi fyrr í ár.

Eitt avlop á kr. 151.860 er eftir, og mælt verður til, at hetta verður flutt aftur á løgukarmin LK62997, Lendisgøtur.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62033 | Havnardalur – fríøkið | 6275 | LK62997 | Lendisgøtur | | Kr. 151.860 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.450.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2021-2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62033, Havnardalur – fríøkið, Brúgvar í Havnardali, og at flyta avlopið á kr. 151.860 aftur á løgukarmin LK62997, Lendisgøtur, og at beina málið í býráðið umvegis fíggarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 247/23 Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 25/22 | 22/00329-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 40/22 | 22/00329-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 112/23 | 22/00329-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 159/23 | 22/00329-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 135/23 | 22/00329-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 153/23 | 22/00329-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 269/23 | 22/00329-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 247/23 | 22/00329-1 |
| 9 Býráðsfundur | | | 22/00329-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna er í troti av bústøðum. Í heyst varð farið undir at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 51a á Velbastað, sí viðhefta skjal 22/00329-2, Økið_broytt til bústaðarbygging.

Broytingin er grundað á ynski um at gera eina kommunala sethúsaútstykking í økinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin fór í heyst undir at broyta ein part av matr. nr. 51a til økisásetingina B – Bústaðarøkið. Broytingin er enn ikki endaliga góðkend í Býarskipanarnevnd Landsins, men verður viðgjørd í nevndini fyrst í februar.

Fyri at fara undir at gera útstykkingina, er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið, sum ætlanin er at byggja á. Harumframt skal verkætlanin projekterast og setast í verk.

Umsitingin sær fyri sær, at økið verður boðið út til arbeiðstakara at menna og byggja, og í tí sambandinum er neyðugt at fara undir at gera útbjóðingartilfarið, sum skal liggja til grund fyri verkætlanini. Kommunan ynskir at bjóða lendið út til projektering og bygging av grundstykkjum, sum kommunan síðani lutar út til privat til bygging av sethúsum.

Økið, sum talan er um at keypa, er uml. 8500 $m^2$ til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
- Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
- Reglugerð fyri útlutan av fastari ogn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum eisini sæst í málinum um broyting av byggisamtyktini, so ynskir staðbundna nevndin at síggja útstykkingarætlanina, tá hon er liðug. Tískil verður mælt til, at umsitingin setir seg í samband við limir í nevndini í sambandi við gerð av útbjóðingartilfarinum, og eigur verkætlanin at verða løgd fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru innkomin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01258 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað fyri part av matr.nr. 51a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00329-2 Økið_broytt til bústaðarbygging

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar fyri verkætlanina og at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 51a, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og heimila umstingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og harumframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, tá hesi viðurskifti eru avgreidd.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn tann 13. mars kl. 12 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

| | | |
|---|---|---|
| P/F Tórhall Hansen á | kr. 6.037.839 u/mvg fyri | 17 grundstykki |
| Sp/f Plan á | kr. 11.191.071,05 u/mvg fyri | 14 grundstykki |

Útboðið var skipað á tann hátt, at tilboðsgevari gav tilboð upp á:
• Skipanaruppskot fyri økið
• Projektering íroknað myndugleikaviðgerð
• Byggibúning

Síðani er ætlanin, at kommunan lutar stykkini út til privatpersónar at byggja síni sethús á.

Í útbjóðingartilfarinum stóð, at tilboðsgevari vinnur upp á bíligasta kostnað. Sambært hesum hevur P/F Tórhall Hansen vunnið útboðið.
P/F Tórhall hansen hevur havt Sp/f Uni Patursson afturat sær sum ráðgevandi verkfrøðing.

Byggimálsdeildin og býarskipanardeildin fóru saman við vinnandi tilboðsgevaranum, P/F Tórhalli Hansen, í eina samráðingartilgongd at finna fram til mest skynsomu gagnnýtsluna av økinum í mun til kostnaðin.

Í hesi tilgongdini varð m.a. komið fram til, at stykkini í skipanaruppskotinum vóru teknað ov trong og avmarkandi til eina vanliga familju at innrætta seg á.
Eitt nú fór tað at gerast trupult at rúma einum bilhúsi á hvørjum av stykkjunum, ið var mett at hava stóran týdning, og tilboðsgevarin var tískil biðin um at tillaga ætlanina nakað. Úrslitið var, at tey 17, heldur trongligu stykkini, vórðu umskipað til 14 rúmligari grundstykkir.

Tilboðsgevarin lat so statt eitt tillagað uppskot inn 15. mai 2023 við nýggjari kostnaðarmeting fyri projektering og byggibúning av samlaðu útstykkingini av 14 grundstykkjum (á umleið 500m² hvørt), ið var tilsamans áljóðandi: <u>6.995.579 kr u.mvg.</u>

Sí viðhefta skipanaruppskot og arbeiðstøkutilboð: *Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21

Í sambandi við at fyrireika økið við tilføringurm, reinsiverki, drenskipan o.a. hevur Tekniska deild eisini gjørt eina kostnaðarmeting fyri «avleiddar verkætlanir». Hon er soljóðandi (u.mvg):

| | | |
|---|---|---|
| Dren av yvirflatuvatni omanfyri útstykkingina: | kr | 312.000 |
| Gøtuljós og íbinding: | kr | 250.000 |
| Reinsiverk við neyðugum leiðingum: | kr | 400.000 |
| Kloakkleiðingar: | kr | 250.000 |
| Vatnleiðing: | kr | 50.000 |
| Brandpostar: | kr | 60.000 |
| | | |
| <u>Tilsamans (u.mvg)</u> | kr | 1.322.000 |

Leggjast skal afturat, at í einum slíkum føri heftir SEV fyri kostnaðin, sum stendst av at tryggja neyðugu el-leiðingarnar til eina nýggja útstykking sum hesa. Í hesum sambandi nevnir SEV fleiri møguleikar í økinum, har knýtast kann í verandi el-kervið á Velbastað.

Skrivlig tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni um keypið av lendinum, sum Føroya jarðargrunnur eigur.
Metti kostnaðurin fyri lendið á matr. nr. 51a á Velbastað (uml 8.500m² av dyrkingarbærum lendi í Øki 2 Velbastaður) er: kr. 1.050.000.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er tískil:

| | | |
|---|---|---|
| Projektering og byggibúning: | kr | 6.995.579 |
| Avleiddar tekniskar verkætlanir: | kr | 1.322.000 |
| Keyp av lendi: | kr | 1.050.000 |
| | | |
| Tilsamans: | kr | 9.367.579 |
| | | |
| <u>Íroknað kommunalt mvg á 6,25% er hetta:</u> | kr | 9.953.053 |
| | | |
| Metti eindarkostnaðurin fyri hvørt grundstykki (á uml. 500m²)<br><u>verður tískil: (9.953.053 / 14):</u> | kr | 710.932 |

Sí annars viðheftu útgreinaðu kostnaðarmetingina fyri samlaðu verkætlanina:

*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j.nr. 22/00329-23. <u>*Afturat kostnaðarmetingini verður mælt til at seta 1 mió. kr av til ókent. Alt eftir hvussu nógv verður brúkt av ókendu puljuni, so kann hetta ávirka endaliga eindarkostnaðin fyri hvørt grundstykki.*</u>

Um umsitingini verður heimilað at halda fram við verkætlanini, og samráðingararbeiðið við tilboðsveitaran kann halda fram, er hugsandi, at smærri tillagingar eiga at verða gjørdar í skipanaruppskotinum, eitt nú í mun til hvussu økið til bilparkering framman fyri útstykkingini eisini tryggjar, at koyribreytin á Ervavegnum (sum er atkomuvegurin niðanfyri útstykkingina) kann breiðkast nakað niðan ímóti grundstykkjunum. Hendan koyribreytin er heldur smøl í dag.

P/F Tórhall Hansen metir, at verkætlanin verður liðugt projekterað í summar. Og um øll neyðug loyvi vera givin í næstum at stykkja út, so kann útstykkingin standa liðug um 1,5 ár eftir, at arbeiðstøkan byrjar.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | | Byggibúning bústaðir | 6475 | | | Nýggj útstykking á Velbastað | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:

- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini kannar um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimilað umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí kunning í ískoytinum omanfyri, har greitt verður frá ætlanini um at gera eina útstykkking við 14 byggibúnum grundøkjum (á uml. 500 fermetrar hvørt), til sethús á Velbastað.

Málið varð tikið av skrá, orsakað av at tilsøgnin frá Búnaðarstovuni fyrilá ikki sum endaliga skjalfest í málinum.

Fyribils tilsøgn um keyp av lendi er nú fingin frá Búnaðarstovuni, sí viðheft skjal: *Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

Sum nevnt var í ísoytinum omanfyri, er metti eindarkostnaðurin fyri hvørt av teimum grundstykkjunum uml. Kr 710.932.

Gevið gætur, at hetta er ein mettur kostnaður, og at fyrivarni skal takast fyri óvissum ella smærri tillagingum í prosjekteringini, sum skal gerast av arbeiðstakaranum í næstum. Hetta hevur væntandi við sær, at endaligi eindarkostnaðurin verður justeraður nakað.

**Skjøl**
*Útstykkning á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykkning á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23
*Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at fáa heimild at selja stykkini.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.

at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí ískoyti til byggi- og býarskipanarnevndina 19. juni 2023 og 11. september 2023

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen

- at játtaðar verða kr. 11 mió. til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, Byggibúning bústaðir, og at nýggj verkætlan við heitinum Nýggj útstykking á Velbastað verður upprættað á konto 6475 til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 248/23 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |
| 24 Heilsu- og eldranevndin | 08.02.2022 | 3/22 | 17/03196-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 41/22 | 17/03196-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 37/22 | 17/03196-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 156/22 | 17/03196-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 180/22 | 17/03196-1 |
| 29 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 17/22 | 17/03196-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 279/22 | 17/03196-1 |
| 31 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 263/22 | 17/03196-1 |
| 32 Heilsu- og eldranevndin | 27.04.2023 | 10/23 | 17/03196-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 135/23 | 17/03196-1 |
| 34 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 117/23 | 17/03196-1 |
| 35 Heilsu- og eldranevndin | 12.09.2023 | 21/23 | 17/03196-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 225/23 | 17/03196-1 |
| 37 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 213/23 | 17/03196-1 |
| 38 Heilsu- og eldranevndin | 17.10.2023 | 25/23 | 17/03196-1 |
| 39 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 265/23 | 17/03196-1 |
| 40 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 248/23 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | | 669 | | 850 | | 906 | | 1.124 | | 1.415 | |
| **Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)** | | | | | | | | | | | | |
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð stødd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð stødd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 m$^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 m$^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið "*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*".

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum

stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**

Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.
Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 m$^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið vaðr einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 $m^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um byggingina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður

frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini "Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD". Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:
- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri hesum arbeiðinum at gera byggiskránna.

Byggiskráin verður eftir ætlan liðug í medio 2022. Og verkætlanin skal eftir ætlan bjóðast út hareftir - ultimo 2022. Bygginevndin hevur tikið støðu til at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Bygginevndin metir, at tað er lættari og betri at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

Ynski er eisini at leggja dent á vælferðatøkni sum heild í røkt í Tórshavnar kommunu. Vælferðatøkni er nógv frammi í verkætlanum í Norðurlondum. Umsitingin er í gongd at gera fáa lýst krøv til vælferðatøkni í byggiskránni, soleiðis at hetta verður knýtt í hesa verkætlan.

Fígging:
Samanlagt eru 10 mió tøkar av løgukarmi konto 2775 eldrarøkt til uppstart, forkanningar, ráðgeving, fyrireiking til útbjóðing av verkætlanini.

- Játtaðar eru 4 mió. av karminum fyri 2021
- Játtaðar eru 6 mió. av karminum fyri 2022

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játta kr. 4 mió. av karminum fyri 2021, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- At játta kr. 6 mió. av karminum fyri 2022, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Flyta peningin áljóðandi samanlagt 10 mió. á konto 2775 eldrarøkt(íløgur), L27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.
- Geva umsitingini heimild at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti, sum bygginevndin mælir til.
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar við vinnandi ráðgevarafyritøku.

  Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at støða verður tikin til leist og útbjóðingarhátt, tá ið byggiskráin er liðug.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gongd at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Neyðugt er at taka støðu til, hvør útbjóðingarháttur skal vera, tí m.a. skulu kappingartreytir og útbjóðingarháttur lýsast í byggiskránni.

Tilmælið er at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Mett er at tað er betri fyri verkætlanina at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti sum lýst omanfyri.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Útsett við atliti til at lýsa ymisku útbjóðingarhættirnar.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Teldupostur sendur limunum í fíggjarnevndini 23. juni 2022: kann fíggjarnevndin taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu?

**Fíggjarnevndin samtykt við telduposti 27. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeiðið at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum er liðugt. Byggiskráin er endaliga granskað og er nú klár at bjóða út. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur staðið fyri hesum arbeiði at gera byggiskránna.

Verkætlanin varð boðin út til undangóðkenning tann 5. septembur 2022 fyri ráðgevaratoymi. 7 Ráðgevaratoymi hava boðið inn. Høvuðsráðgevararnir í hvør sínum toymi vóru hesir:

ARKITEKTAR 99 / BIG
EYA/CUBO
KONTRAST
MAP
OSBJØRN JACOBSEN / HENNING LARSEN
SNA
ZETA/BRIM

Út frá eini heildarmeting hevur bygginevndin valt at fara víðari við fýra ráðgevaratoymum, sum vóru útvald og grundað á meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, hvussu viðkomandi framsendu tilvísingarnar vóru. Tey valdu ráðgevaratoymini eru:

EYA/CUBO
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA

Eftir ætlan verður lidna byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til omanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi, sum skulu lata sítt tilboð inn eftir ætlan í marts 2023.
Fyri tey tilboð, sum lúka treytirnar (eru kondisjónsmessig), men sum ikki vinna útboðið, verður latin samsýning á 350.000,- kr. Peningur er tøkur til endamálið.
Vinnarin fær í boði at skriva sáttmála við Tórshavnar kommunu um uppgávuna. Uppgávan umfatar heildarráðgeving í sambandi við gerð av skipanaruppskoti, verkætlanaruppskoti, forprosjekti, høvuðsprosjekti, útboði í høvuðsarbeiðstøku, umframt uppfylging og eftirlit í sambandi við útinnan. Uppgávan umfatar eisini tilhoyrandi útiøki.

Heildarráðgevingaravtala kemur aftur í nevnd og væntast at verða klár í seinasta lagi í apríl 2023.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At góðkenna byggiskrá, sum fyriliggur.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí viðmerking at byggitíðin verður partur av kappingartreytunum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar varð sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til niðanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi:

EYA
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA/SMJ/LBF

Tilboðini komu inn 14 mars 2023

Dómsnevndin hevur eftir gjølla gjøgnumgongd av innkomnu uppskotum, gjørt niðurstøðu útfrá teimum kriterium, sum vóru sett í útbjóðingartilfarinum.

Dómsnevndin hevur 27.03.2023 lagt úrskurðin fyri bygginevndina, sum hevur samtykt at taka undir við niðurstøðuni hjá dómsnevndini.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- At góðkenna úrslitið og dómsnevndarálitið, sum dómsnevndin mælir til og bygginevndin hevur samtykt
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar um projektering og ráðgeving við vinnandi ráðgevarafyritøkuna og venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í sáttmálasamráðingum við ráðgevarafyritøkuna EYA, sum vann kappingina um prosjektering og heildarráðgeving av Røktarheimi á Stórubrekku.

Nú fyriliggur uppskot á ráðgevarasáttmála millum Tòrshavnar.kommunu og ráðgevarafyritøkuna EYA.

Samlaði kostnaður á heildarráðgeving er 23.300.000 kr. u/mvg., sum svarar til ein samlaðan kostnað á 24.756.250kr í mvg(6,25%).

Verkætlanin verður eftir ætlan liðugt prosjekterað medio 2024.Vísandi til fylgiskjal 9 verða 16.077.000 u/mvg – sum svarar til 17.081.812,5 v/mvg – brúktar til prosjektering fram til medio 2024. Síðani skulu 7.223.000 – sum svarar til 7.674.437,50 v/mvg – brúkast til eftirlit, prosjekt uppfylging og 1 ára gjøgnumgongd undir byggitíðini, sum er eftir ætlan umleið 3 ár.

Bygginevndin hevur á fundi 12.09.2023 gjøgnumgingið og góðkent sáttmálan, men hevur tað viðmerking til sáttmálan, at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, eigur at verða endurskoðað í mun til at hædd verður tikin fyri neyðugu nevndarviðgerðunum í avvarðandi nevndum. Hetta kemur helst at leingja projekteringstíðarskeiðið nakað.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða størstu byggifyritøkunum í Føroyum at geva tilboð at gera Røktarheimið á Stórubrekku. Hetta verður eftir ætlan klárt at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku í august 2024.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingrstjórin, tekniski stjórin, býararkitekt-urin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

• at taka undir við fyriliggjandi uppskoti upp á ráðgevarasáttmála, tó við fyrivarni um at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, verður endurskoðað.
• at játta samlaða kostnað á heildarráðgeving á 24.756.250krv/mvg., fíggjað soleiðis:

15 mio. kr. av karminum LK 27012 nýtt røktarheim við røktaríbúðum at flyta á L 27012 røktarheim við røktaríbúðum

2.081.813 kr. er tøkar á L 27012 og verða somuleiðis brúktar til endamálið

Restin av upphæddini sum ikki fellur fyrrenn í 2025, 7.674.437 kr. verður játta á FÆ 2025 til L 27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

• at geva umsitingini heimild at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku til størstu byggifyritøkurnar í Føroyum í 2024, tá ið verkætlanin er liðug prosjekterað og klár at bjóða út.
• at geva umsitingini heimild at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi byggifyritøku, sum hevur besta tilboðið at byggja Røktarheimið á Stórubrekku.
• Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 1019 |
| | Formansins merki: |

**Ískoyti:**
Prosjekteringin av Røktarheiminum á Stórubrekku er byrjað. Ráðgevarafyritøkurnar EYA og CUBO hava miðvíst verið í tøttum samstarvi við umsiting og brúkarar at skipa og disponera sjálvan bygningin og allar funktiónir í bygninginum. Hetta arbeiðið hevur gingið sera væl, og nú er skipanaruppskotið liðugt. Klárt er nú at fara undir næstu stig í prosjekteringini - prosjektuppskotið.

Bygginevndin hevur á fundi 16.10.2023 gjøgnumgingið og góðkent skipanaruppskotið av Røktarheiminum á Stórubrekku. Bygginevndin tekur undir við og góðkennir dispositiónsuppskotið treytað av, at prosjektið verður tillagað í prosjektfasuni soleiðis, at komið verður at uppruna fermetrum og targetprísi sambært byggiskránni uttan at ávirka seingjar- og røktardeildir.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- at taka undir við fyriliggjandi skipanaruppskoti og við teimum treytum, sum bygginevndin mælir til
- at beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 17. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 249/23 Umsókn um sundurbýti av matr,nr, 996a, Tórshavn, og keyp av lendi hjá TK.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 144/23 | 23/03120-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 270/23 | 23/03120-3 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 249/23 | 23/03120-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr.nr. 996a, Lykkjugerði 9, Tórshavn, hevur sent teknisku deild eina umsókn um yvirtøku av vegnum í Lykkujgerði, ið er atkomuvegur til sjey húskir og eitt grundstykki. Tekniska deild boðaði umsøkjaranum frá, at kommunan ikki kann yvirtaka privata vegin Lykkjugerði við ástandandi húsi. Neyðugt er at frábýta vegin, so hesin fær sín egna matrikul. Tekniska deild hevur eisini boða frá at, tá ið frábýtið er framt, kann málið viðgerast politiskt, um kommunan skal yvirtaka Lykkjugerð ella ikki.

Matr.nr. 996a er 837 fermetrar til støddar, her av eru 462 fermetrar útlagdir sum vegur og gøta. Tá ið vegur og gøta eru frábýtt verður sethúsagrundstykkið minni enn 500 fermetrar og sundurbýti verður tí í stríð við byggisamtyktina.

Eigarin av matr.nr. 996a, hevur síðani verið á fundi og sent inn umsókn um at keypa part av matr.nr. 993a, Tórshavn, so sethúsagrundstykkið verður 500 fermetrar til støddar. Søkt verður um at keypa áleið 65 fermetrar av matr.nr.993a, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Víst verður til kortskjal »*23/03120-1 Uppskot matr.nr. 996a.pdf*«

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini (seinast broytt 11. sept. 2023), har tað m.a. er ásett:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin er áhugað í at varðveita gøtuna millum Heygsgerði og Lykkjugerði. Hendan farleiðin sæst á myndakortum frá 1958 og verður enn nýtt. Gøtan er partur av útlagda økinum.
Matr.nr. 993a hevur met at verða fríøkið og vanlig siðvenja er ikki at selja partar av frílendi. Í hesum serliga førið metur umsitingin at kommunan kann loyva einum undantaks loyvi.
Víst verður á at breiddin á útlagda vegnum ikki kann gerast smalari og at vegurin verður nýttur til sjey húskið og eitt grundstykki.
Um vegin í Lykkjugerði skal frábýtast er neyðugt, at sethúsastykkið er 500 fermetrar. Umsitingin metur ikki at tað er ráðiligt at loyva bygging á stykkinum, ið søkt verður um, tá hetta liggur sum frílendi. Mælt verður til at ein servituttur verður tinglisin á ongina um at onki kann byggjast á økið, ið verður lagt aftur at matr.nr. 996a, um umsóknin um keypt verður gingin á møti.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

22/07387 Umsókn um yvirtøku av veg matr.nr. 996a, Lykkjugerði 9, Tórshavn.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03120-1 Uppskot matr.nr. 996a.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, í hesum serliga føri, at selja umsøkjaranum umleið 65 fermetrum av fríøkinum, treytað av at tinglisið verður á ognina, at onki kann byggjast á økið, sum keypt verður.

Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at viðmæla sundurbýtinum av matr.nr. 996a, treytað av at umsóknin um keyp av umleið 65 fermetrum av matr.nr. 993a, Tórshavn, verður gingin á møti, so frábýtið tilsamans verður minst 500 fermetrar, og beina málið víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmællinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 250/23 Umbøn um eykajáttan til konto 7110 Renovatión

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.10.2023 | 46/23 | 23/05757-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 274/23 | 23/05757-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 250/23 | 23/05757-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 23/05757-1 |

**Upprunin til málið**
Tekniski stjórin hevur biðið leiðaran á Brennistøðini gjørt eina neyva meting av, hvørt dagførda játtanin á konto 7110 kemur at halda í ár. Niðurstøðan hjá leiðaranum á Brennistøðini er, at konto 7110 hevur tørv á eykajáttan á 2 mió. kr. fyri at halda játtanina í 2023.

**Lýsing av málinum**
Í 2022 endaði konto 7110, Renovatión við einari alt ov stórari meirnýtslu. Hetta kom óvart á tekniska stjóran, sum ikki varð kunnaður um støðuna í nóg góðari tíð.

Fyri ikki at enda í somu støðu aftur í 2023, hevur m.a. verið roynt at heinta stóran part av meirnýtsluni í 2022 inn aftur yvir raksturin í ár. Játtanin til 7110 er beint undir 20 mió. kr., sum er á leið 7,5 mió. kr. lægri enn árliga miðaljáttanin til konto 7110 hesi seinastu árini.

Tekniski stjórin hevur tí havt eitt vakið eygað við, um Brennistøðin fer at megna at halda nógv skerdu rakstrarjáttanina í ár.

Fyrst í august í ár var fundur við leiðaran á brennistøðini, har hann segði seg vænta, at játtanin fyri 2023 fór at halda, um einki óvæntað hendi restina av árinum. Síðan tá er hann farin at ivast í hesi meting, tí maskinur og amboð eru gingin fyri, og hetta hevur havt stórar umvælingarkostnaðir við sær. Víst verður til fundarfrásøgn frá fundi við leiðaran á brennistøðini 3. august 2023 (jnr. 23/05757-2) og góðkenningarnar av mánaðarroknskapunum síðan tá.

21. september varð leiðarin á Brennistøðini biðin um at gera eina neyva meting av játtanini á 7110 fyri restina av 2023. Nú metir leiðarin á Brennistøðini, at tað verður neyðugt at biðja um eina eykajáttan á 2 mió. kr. til raksturin á konto 7110 fyri at halda játtanina í 2023, sí teldupost frá leiðaranum á Brennistøðini, dagfestur 21.09.2023 *(jnr. 23/05757-3 Møgulig umbøn um eykajáttan)*.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Løgukarmurin til brennistøðina, høli til skiljing og endurnýtslu LK71007 á deild 7175 verður lækkaður við 2 mió.kr., úr 3,8 mió. kr. niður í 1,8 mió. kr.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05757-2 Fundarfrásøgn frá fundi við leiðaran á Brennistøðin, 3. august 2023
23/05757-3 Møgulig umbøn um eykajáttan

| | Blað nr.: 1023 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Formansins merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71007 | Brennistøðin, høli til skiljing, endurnýtsla | 7110 | | Renovatión | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri mælir til

- at eykajáttan á 2 mió. kr. til konto 7110 verður fíggjað av løgukarmi LK71007.
- og at beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 251/23 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 15/22 | 17/03154-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 79/22 | 17/03154-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 68/22 | 17/03154-1 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 32/22 | 17/03154-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 201/22 | 17/03154-1 |
| 18 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 190/22 | 17/03154-1 |
| 19 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.03.2023 | 8/23 | 17/03154-1 |
| 20 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 14/23 | 17/03154-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 102/23 | 17/03154-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 134/23 | 17/03154-1 |
| 23 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 99/23 | 17/03154-1 |
| 24 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 20.06.2023 | 27/23 | 17/03154-1 |
| 25 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.10.2023 | 44/23 | 17/03154-1 |
| 26 Náttúru- og umhvørvisnevndin | | | 17/03154-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 275/23 | 17/03154-1 |
| 28 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 251/23 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:
1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og CO2-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:
- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og CO2-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.

2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*<u>ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027</u>*

Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.

**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

*<u>ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027</u>*
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

*<u>ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027</u>*
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

*<u>Ætlan 2022-2027</u>*
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki, sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:
- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina
- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam,Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging, og politiskt ynski er at binda fleiri kommunalar bygningar í hesa skipan. Bygningarnir í uppskoti til íbinding í 2022 eru hesir:
- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Fimi-HB-B36
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin
- Brúni skúli

Viðmerkjast skal, at Gundadalshøllin verður ikki íbundin, fyrr enn avgerð er tikin, um høllin skal umbyggjast, útbyggjast ella byggjast av nýggjum. Tryggjað verður, at klárt er at binda í høvuðsleiðina hjá fjarhitanetinum, tá avgerð er tikin hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at fyrisitingin fær heimild til:

At flyta 1 mió. av stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til nýggja verkætlan "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177 til at gera prosjekt, kostnaðar- og tíðarmeting til útboð av at íbinda nevndu bygningar í fjarhitanetið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við tí ískoyti, at heimild eisini verður givin til at seta arbeiðið í gongd at binda hvønn bygning sær í fjarhitanetið. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í mars 2022 vórðu 1 mió. kr fluttar av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og fara undir arbeiðið. Bygningarnir, har arbeiðið við at innleggja nýggja hitaskipan er boðið út, eru fylgjandi:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Brúni skúli (Fríðriksgarður)
- Guli skúli (Ytri skúli)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin

Arbeiðið varð boðið út umvegis útboðsportalin hjá Tórshavnar kommunu, og bjóðaðu í minsta lagi tvey feløg upp á arbeiðið við hvønn av bygningunum. Tikið er av tilboðunum frá fylgjandi feløgum: HVS Tænastan, Bjørnin, Orkuloysnir, Maria Poulsen.

Tíðarætlanin fyri arbeiðið er gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Grevstrararbeiðið og tað at taka upp og burturbeina oljutangar verður boðið út í næstum. Eftir ætlan verður farið undir arbeiðið, so tað er liðugt í 2022. Íroknað kostnað til at gera útbjóðingartilfar, sjálvt arbeiðið við grevstri, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar, og íbindingargjald verður samlaði kostnaðurin 4,5 mió. kr. Sostatt resta tað 3,5 mió. kr í fyri at útinna arbeiðið sambært innkomnu tilboðunum.

Eisini tíðarætlanin fyri arbeiðið við at binda skúlan á Argjahamri í fjarhitanetið verður gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Tað arbeiðið verður væntandi boðið út í næstum, soleiðis at neyðuga tilfarið kann fáast til vega, áðrenn farast skal undir arbeiðið.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum, íroknað skúlan á Argjahamri, er knappar 1.195.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og elframleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 284.528 kg $CO_2$ og 0,065 kg/ $CO_2$ pr. kr. pr. ár. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka við o.u. kr. 190.000.

Á karminum fyri konto 6177, orkupolitikkur, eru fyri 2022 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum eru kr. 1.000.000 játtaðar til at fyrireika og at leggja fjarhita inn í kommunalar bygningar. Til sama endamál er tørvur á kr.

3.500.000 afturat í 2022. Verða kr. 1.500.000 játtaðar til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu og kr. 1.000.000 til verkætlan um heita vatnið á Lygnnesi í Kollafirði, verða sostatt kr. 1.000.000 eftir til onnur orkuátøk í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:

- játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið,
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin ger og eftirsendir nevndini tíðarætlan.

Fíggjarnevndin 24. august 2022: Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið. Nevndin viðmerkir, at tíðarætlan fyri hvønn bygning sær skal fyriliggja, áðrenn arbeiðið verður sett í verk.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á karminum fyri konto 6177, Orkupolitikkur, eru fyri 2023 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum verður skotið upp at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og útinna arbeiðstøkur fyri 2023.

Arbeitt verður við at leggja nýggja hitaskipan í niðanfyristandandi bygningar:

- Ellisheimið
- Barakk við Ellisheimið
- Umlættingarheimið
- Dagstovnurin Løkjatún

Tíðarætlan fyri arbeiðið við at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið er treytað av gongdini við at útbyggja fjarhitanetið og verður tí gjørd í neyvt samráð við Fjarhitafelagið. Hetta merkir, at arbeitt verður eftir at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið so hvørt fjarhitanetið kemur verður ført fram við og er ført fyri at veita fjarhita við hvønn bygning. Møguliga kemur onkur bygningur/onkrir bygningar afturat, um útbyggingin av fjarhitanetinum í 2023 loyvir tí.

Íroknað kostnaðin er útbjóðing, arbeiðstekningar, graviarbeiði, brekking, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar og íbindingargjald.

Arbeiðið við at taka upp og burturbeina oljutangar verður gjørt eftirfylgjandi. Eftir verandi ætlan verður farið undir arbeiðið skjótast gjørligt, so tað er liðugt í 2023. Kostnaðurin av hesum er mettur til at verða kr. 3,5 mió.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum er knappar 35.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og el-framleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 8.000 kg $CO_2$. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | | L61707 | Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar | | 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ókend |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:
- at játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlan L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið, og
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. mars 2023:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti:**
Umhvørvisdeildin er biðin um fleiri upplýsingar og status fyri arbeiðini, sum vórðu ætlað í 2022. Víst verður til viðløgdu skjøl.

Í stuttum kann upplýsast, at í 2022 vórðu játtaðar kr. 4,5 mió. til at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið. Tilboð eru fingin upp á arbeiðini.

Arbeiðið við at taka verandi hitaskipan úr bygningunum og gera arbeiðini liðug má gerast, tá fjarnitanetið er útbygt soleiðis, at tað er í nánd av bygningunum og er klárt til at kunna veita hita til teirra. Av hesi orsøk eydnaðist í 2022 bert at nýta kr. 1.711.760 av játtaða peninginum fyri 2022. Til 28.03.2023 vóru av játtanini frá 2022 harumframt brúktar kr. 217.800. Írestandi arbeiðini verða framd, so hvørt fjarhitanetið kemur fram til og kann veita hita til bygningarnar.

Hinvegin er fjarhitanetið longu nærhendis teimum bygningunum, sum mælt verður til at nýta játtan fyri 2023 at umleggja og binda í, soleiðis at tað til hesar bygningar ikki er neyðugt at bíða, men at arbeiðið kann fara í gongd sum skjótast.

Um býráðið ynskir at íbinda allar teir kommunalu bygningar í fjarhitanetið, sum liggja á leiðini ella nærhendis fjarhitanetinum, mælir fyrisitingin til, at omanfyri nevndu bygningar verða íbundnir, hóast útroknaða afturgjaldstíðin er lutfalsliga long.

Aðrar verkætlanir, sum møguliga kundu verið fíggjaðar í 2023, eru av ymiskum orsøkum ikki enn á einum búningarstigi, har kostnaðurin er kendur, ella har til ber at seta tær í gongd.

Tekniska fyrisiting er biðin um at arbeiða við, hvussu Eysturskúlin og nærhendis bygningar kunnu verða umlagdir til fjarhita ella grøna orku.

Fyrisitingin hevur fyribils kannað, um møgulig útbygging av sjóhitaskipanini við Strond til at nøkta orkutørvin hjá røktarheiminum Láargarður og býlinginum Tórsbyrgi skynsamt kundi fevnt um Eysturskúlan,

Tjarnargarð og møguligar aðrar kommunalar bygningnar í Eysturbýnum. Ein stutt kanning av hesum bendir á, at aðrar loysnir tekniskt, fíggjarliga og frá einum heildarsjónarhorni høvdu verið meiri skynsamar.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið omanfyri.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Annfinn Brekkstein og Súna Mørk, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Elsa Berg, mælir til, at til næsta fund kemur umsitingin við einum status av Eysturskúlanum, herundir umvælingartørv og møguligar grønar orkuloysnir.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við at fjarhiti verður lagdur til Ellisheimið, Dagstovnin við Løkjatún og Dansifrøi og játta kr. 2 mió. til endamálið.

Eisini samtykt at biðja umsitingina koma við uppskoti um, hvørjir aðrir stovnar kunnu leggja um til alternativa orku og at biðja umsitingina koma við yvirliti yvir $Co^2$ útláti og fíggjarligar avleiðingar síðani umleggingarnar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað, hvørjar møguligar loysnir eru til umlegging av Eysturskúlanum til grøna orku v.m. Víst verður til jnr. 17/03154-36 Upprit um Eysturskúlan – orkuátøk og umvælingar. Niðurstøðan av kanningini er á blaðsíðu 2 í uppritinum.

**Skjøl**
Jnr. 17/03154-36 Eysturskúlin – orkuátøk og umvælingar

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 20. juni 2023:** Nevndin tekur undir við loysnunum, og heimilar umsitingini at bjóða arbeiðið út, og síðani leggja málið aftur fyri nevnd.

**Ískoyti:**

<u>Verkætlanin «Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum»</u>
Vísandi til samtykt á fundinum hin 20 juni 2023 um Eysturskúlan, verður skotið upp, at flyta kr. 1,5 mió. av karminum "LK61705", til verkætlan nevnd "Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum" og at heimila umsitingini at fyrireika og bjóða út arbeiðstøkur viðvíkjandi fylgjandi átøkum, sum eru lýst í frágreiðingini frá RAM Sp/f *(jnr. 17/03154-36 Upprit - um Eysturskúlan - orkuátøk og umvælingar)*:

- Durar/hurðar
- Stýringar
- Luft til Luft

og gera arbeiðstøkusáttmálar innan omanfyrinevnda fíggjarkarm.

Mett verður, at oljunýtslan í Eysturskúlanum lækkar uml. 30-40 % við hesum átøkum. Og metta árliga sparingin verður uml. kr 130.000,-

Hetta er samstundis fyrsta stigið í samlaðu ætlanini, at Eysturskúlin í framtíðini einans brúkar grønar orkukeldur. Úrslitið av átøkunum kemur at hava ávirkan á næsta stig. Komið verður aftur í nevndina, áðrenn næsta stig skal setast í verk.

Verkætlanin «Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði«
Skotið verður upp, at flyta kr. 50.000 av karminum "LK61705", til verkætlanina nevnd; "Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði" til fyrireikingar, eftir sama leisti, sum gjørt var í Eysturskúlanum. Umsitingin kemur aftur í nevndina við niðurstøðum og tilmæli um fíggjarkarm.

Verkætlanin «LED ljós í ítróttarhøllum«
Leiðarin á Ítróttaanlegg hevur fingið eina greining av ljósviðurskiftunum í ítróttarhøllum, frá donsku ráðgevingarfyritøkuni LUMA lysteknik. Sí skjal *(jnr. 17/03154-38 Revideret energirapport)*.

Greiningin er um fylgjandi hallir:
- Høllini á Hálsi, (eisini judo og borðtennishøllini í kjallaranum)
- Badmintonhøllin
- Gundadalshøllin
- Hoyvíkshøllin
- Høllin í Kollafirði

Frágreiðingin er gjørd á tann hátt, at hon lýsir, hvussu ljósviðurskiftini eru í omanfyri nevndu høllum, og hvørji krøv eru til ljósviðurskiftini til ymisku ítróttagreinarnar.

Ítróttaanlegg hevur biðið um hesa frágreiðing, tí ynskt verður at fáa lýst hesi viðurskiftir nærri:

- Hvat kostar at skifta ljósini í oman fyri nevndu høllum til LED-útgerð ( led-armatur)?
- Hvussu leingi tekur tað, áðrenn íløgan er spard inn aftur?
- Hvussu stór er sparingin í kwh?
- Hvussu nógv er sparingin í kr.?

Frágreiðingin vísir, at metta samlaða íløgan fyri at skifta til LED-útgerð í omanfyri nevndu høllum, er góðar kr. 3,0 mió. Við dagsins kwh-prísi er metta árliga sparingin áleið kr. ½ mió. og tað tekur góð 5 ár at spara íløguna inn aftur. Harafturat kemur ein stór sparing í CO2 útláti.

Skotið verður upp at flyta kr. 3,5 mió. av karminum LK61705, til verkætlanina «LED ljós í ítróttarhøllum« og heimila umsitingini at fyrireika, prosjektera, bjóða arbeiðstøkur út, og fyrireika arbeiðstøkusáttmálar innan hendan fíggjarkarm.

**Skjøl**
17/03154-36 Upprit - um Eysturskúlan - orkuátøk og umvælingar
17/03154-38 Revideret energirapport

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| Deild | Løgukarmi | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum | 1.500.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði | 50.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | LED-ljós í ítróttarhøllum | 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Tilsamans 5.050.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 715.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til:

- at flyta kr. 1,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum»
- at flyta kr. 50.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði«

Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla til:
at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «LED ljós í ítróttarhøllum«

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 252/23 Skjótløðistøð til kommunal akfør

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 43/22 | 22/04583-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 258/22 | 22/04583-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 248/22 | 22/04583-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.10.2023 | 45/23 | 22/04583-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 273/23 | 22/04583-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 252/23 | 22/04583-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala verkstaðið hevur víst á tørvin á eina skjótløðistøð til kommunal akfør og maskinamboð og hevur í tí sambandi spurt, um hetta kann fíggjast av fíggjarkarminum á konto 6177, Orkupolitikkur. Ein partur av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu er at skifta akfør hjá kommununi til grøna orku. Í løtuni merkir hetta el-rikin akfør.

**Lýsing av málinum**
Alsamt fleiri kommunal akfør eru el-rikin og allir vanligir bilar verða skiftir til el-bilar, so hvørt teir skulu endurnýggjast.

So hvørt størri akfør og maskinamboð skulu endurnýggjast, verður mett um, hvørt nøktandi el-rikin alternativ eru tøk. Møguleikar til at løða og løðitíðir eru partur av slíkari meting. Í tí sambandi er og verður alsamt størri tørvur á skjótløðistøðum.

Skjótløðistøðir krevja sera nógva effekt, sum setir stór krøv til el-netið. Í onkrum førum kann staðfestast, at við kommunalar rakstrarstovnar nøktar verandi el-net ikki tørvin á vanligum løðistøðum, tíansheldur hjá skjótløðistøðum. Tí er í løtuni avmarkað, hvar skjótløðistøðir kunnu uppsetast.

Á Hjalla er el-netið nóg sterkt til skjótløðistøðir. Fyrisitingin metir, at tað er skynsamt at seta fyrstu skjótløðistøðina upp við kommunala verkstaðið á Hjalla. Har fer eftir tørvi at bera til at løða kommunal akfør og maskinamboð, umframt í sambandi við eftirlit, viðlíkahald og umvæling.

Væntaði samlaði kostnaðurin av einari skjótløðistøð er kr. 150.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fíggjarkarmurin fyri 2022 á konto 6177, orkupolitikkur, er 8 mió. kr. Harumframt er ein minni restupphædd frá 2021 á umleið kr. 370.000, ið er disponerað til at skifta gøtuljós til LED.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Av fíggingini á 8. mió. kr. fyri 2022 er fylgjandi játtað:
Kommunalir bygningar bindast í fjarhitanetið, kr. 4,5 mió.
Verkætlan um at gagnnýta heita vatnið í Kollafirði, kr. 1 mió.
Hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu, kr. 1,5 mió.
Harumframt verður arbeitt við eini verkætlan um at nýta sjóvarhita til Lágargarð o.a. Treytað av endaligari játtan og at arbeiðið kann setast í gongd í 2022 kann væntast, at í minsta lagi 0,5 mió. kr. verða brúktar til hetta í 2022.

Eftir eru sostatt kr. 0,5 mió. kr. til onnur orkuendamál, íroknað skiftið til LED og el-rikin akfør.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | X | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 2177 | Nýggj | Skjótløðistøðir | Ja | 150.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 150.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á teknisku deild mæla til at:
- Tórshavnar kommuna setir eina skjótløðistøð upp til el-rikin akfør og maskinamboð staðsett á kommunala verkstaðnum á Hjalla,
- kostnaðurin á kr. 150.000 verður fluttur av fíggjarkarminum á konto 6177, orkupolitikkur, á eina nýggja løgujáttan til skjótløðistøðir,
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

| | **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 1040 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Leiðarin á verkstaðnum hevur upplýst, at løðistøðin er komin og verður sett upp í nærmastu framtíð. Uppsetingin verður fíggjað yvir raksturin á verkstaðnum.
50.000 kr. standa eftir á verkætlanini, og mælt verður til at flyta hesa upphæd aftur á løgukarmin.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☒ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | L61710 | Skjótløðistøðir til kommunal akfør | 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | | Kr. 50.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin mælir til at loka verkætlanina L61710, Skjótløðistøðir til kommunal akfør, og at flyta avlopið á kr. 50.000 aftur á løgukarmin LK61705, Orkupolitikkur, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 253/23 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |
| 6 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 271/20 | 20/01519-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 67/20 | 20/01519-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 245/20 | 20/01519-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 323/20 | 20/01519-2 |
| 10 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 295/20 | 20/01519-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 65/21 | 20/01519-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 240/21 | 20/01519-2 |
| 13 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 247/21 | 20/01519-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 11.09.2023 | 38/23 | 20/01519-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 232/23 | 20/01519-2 |
| 16 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 215/23 | 20/01519-2 |
| 17 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 253/23 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.** Verkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Grundstykkið er matrikulerað, og er breiddin til vegin einans uml. 20 metrar, vísandi til at ein geiri á 4 metrar er matrikuleraður til økið omanfyri.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigaran av ognini, og eigarin er sinnaður til at selja kommununi lendi á uml. 310 fermetrar burtur av matr. nr. 43i og 43h, fyri kr. 400.000,00 Hetta verður gjørt við marknaumskipan.

Breiddin til vegin verður tá uml. 26 metrar, og ber tá til at gera 10 parkeringsbásar á økinum, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu loysn, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9 Kort yvir parkeringsøkið við skúlan á Velbastað.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nýtt tilfar er komið inn í málinum, sum verður viðgjørt í umsitingini og møguliga verður klárt til fundin.

**Tekniska nevnd 01. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, samstundis sum umsitingini verður heimilað at yvirtaka geilina matr. nr. 22a, sum kommunan hevur gjørt til gøtu, har fyrsti partur er trappa, tí talan er um brattlendi. Gøtan er føst farleið millum skúla og dagstovn og við eini yvirtøku kann gøtan eisini gerast atgongd til matr. nr. 43a og síðani við eini marknaumskipan kann kommunan fáa tvey eyka parkeringspláss fram við vegnum og at beina málið í býráðið umvegis figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipananevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til verkætlanina at keyp lendið og gera parkeringspláss í Velbastað, eru 400 tkr. játtaðar á L81041. Sambært kostnaðarmeting frá umsitingini er samlaða kostnaðurin mettur til 1.100.000 kr. Sostatt íresta kr. 700.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kr. 700.000 verða játtaðar av konto 8175, LK81043, Parkeringstunnil, á konto 8175, L81041, Parkering við skúlan á Velbastað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Í samráðingartilgongdini ynskti eigarin at minka um søluna til kommununa við uml. 128 fermetrum netto, soleiðis at tað lendi hann hevur eftir til samans verður uml. 1.018 fermetrar.

Málsviðgeri á teknisku umsiting hevur viðgjørt verkætlanina um ger av parkeringsøkinum, og vísir til, at kommunan bert tørv á lendinum framvið vegnum ( gula markeraða økið j.nr. 20/01519-35 ) sum til samans er til víddar 184 m2. ( Harav uml. 128 m2 eru burtur av matr.nr. 43i og uml. 56 fermetrar av húsamatrikklinum matr.nr. 43 h.) Tískil letur tað seg gera at selja avlopsfermetrarnar netto uml. 128 fermetrar aftur til eigara av matr.nr. 43i og 43h.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at fylgja samtyktini frá teknisku nevnd, og eisini at selja umsøkjara uml. 128 fermetrar netto, ( Sí kortskjal j. nr. 20/01519-35 ) Søluprísur kr. 50.000,-

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælini frá teknisku nevnd 4. oktober 2021 og fíggjarnevndini 20. oktober 2021, ið vórðu einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 390.575,-
Kommunan hevur/skal fremja nakrar átrokandi verkætlanir nú í summar/heyst. Millum hesar verkætlanir teljast m.a. gerð av parkeringplássi við Karlamagnusarbreyt, miðoyggjar til frama fyri ferðslutrygdina á Marknagilsvegnum og á Vegnum langa, broytan av omankoyringini til útstykkingina á Hamrinum á Argjum, og at betra um útsýnið, tá koyrt verður av Hoyvíksvegi t.e. flytan av kantsteinum á parkeringsplássinum við bridgehúsið, so parkeraðir bilar ikki taka útsýnið.
Aðrar smærri átrokandi vegaverkætlanir eru í bíðistøðu, tí fígging ikki er tøk.
Omanfyri nevndu verkætlanir verða allar fíggjaðar av konto 8115, sum er vegir o.a. planlegging.

Kostnaður av ítøkiligum átrokandi verkætlanum, ið eru í gongd / skulu byrja, er kr. 950.000,- v. kom. mvg.

Konto 8115 er ovbyrjað, og kann væntast at hava stórt hall við ársenda, um øll arbeiðini skulu fremjast.
Vísandi til omanfyrinevnda verður mælt til, at avlopið av omanfyri nevndu verkætlan á kr. 390.575,- verður flutt á konto 8115.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81041 | Parkering við skúlan á Velbastað | 8115 | | Vegir o.a. planlegging | | 390.575,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 390.575, verður flutt av løgukonto L81044 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux á rakstrarkonto 8115 fyri vegir o.a. planlegging, og at verkætlanin parkering við skúlan á Velbastað verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 1045<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 254/23 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 35/21 | 21/00676-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 158/21 | 21/00676-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 193/21 | 21/00676-7 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 4/22 | 21/00676-7 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 15/22 | 21/00676-7 |
| 6 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 13/22 | 21/00676-7 |
| 7 Tekniska nevnd | 11.09.2023 | 39/23 | 21/00676-7 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 233/23 | 21/00676-7 |
| 9 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 214/23 | 21/00676-7 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 254/23 | 21/00676-7 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá teknistovuni MAG, um at víðka um bygningin hjá Kemilux, niðan í móti vegnum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við omanfyri nevndu umsókn, hevur spurningurin stungið seg upp, um tað ikki er skilagott at dagføra verandi veg/vegir (tveir vegir lið um lið) soleiðis at bert ein vegur verður.

Í hesum sambandi hevur hevur kommunan umbiðið eitt uppskot og kostnaðarmeting frá sama ráðgevara um eina nýggja vegaloysn á nevnda staði.
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 4,1 mió. kr. u/mvg.

Kostnaðurin fyri at gera eitt prosjekt klárt til útboð er 300.000 kr. u/mvg., ella 320.000 v/mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til vegaloysn j.nr. 21/00676-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |

| Býráðsfundur<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 1046<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um at játta pening til projektering av omanfyri nevndu verkætlan, klárt til útbjóðing.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato august-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **Lokað verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður av tilboðnum uppá projektering av verkætlanini
- At játtaðar verða kr. 320.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux"
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við tí ískoyti, at heimilað verður umsitingini at bjóða arbeiðið at gera verkætlanina út í innbodnari lisitatión. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión varð hildin 20.12.21, og komu 5 tilboð inn, har tað lægsta boðið var 5,73 mió. kr. uttan mvg. Óvæntaðar útreiðslur eru mettar til 15%, svarandi til 900 tkr.
Samlaði fíggjartørvurin verður 6.63 mió. kr. uttan mvg. Íroknað kommunalt MVG verður talan um 7,1 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At játta kr. 7,1 mió. kr. av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á stovnsnummar 8175, L81044, Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux,
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at peningurin fyri søluna av lendi verður mótroknaður í játtanini.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

Elsa Berg boðaði frá, at hon var ógegni at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhenda til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 891.433,-
Kommunan hevur/skal fremja nakrar átrokandi verkætlanir nú í summar/heyst. Millum hesar verkætlanir teljast m.a. gerð av parkeringplássi við Karlamagnusarbreyt, miðoyggjar til frama fyri ferðslutrygdina á Marknagilsvegnum og á Vegnum langa, broytan av omankoyringini til útstykkingina á Hamrinum á Argjum og at betra um útsýnið, tá koyrt verður av Hoyvíksvegi, t.e. flytan av kantsteinum á parkeringsplássinum við bridgehúsið, so parkeraðir bilar ikki taka útsýnið.
Aðrar smærri átrokandi vegaverkætlanir eru í bíðistøðu, tí fígging ikki er tøk.
Omanfyri nevndu verkætlanir verða allar fíggjaðar av konto 8115, sum er vegir o.a. planlegging.

Kostnaður av ítøkiligum átrokandi verkætlanum, ið eru í gongd / skulu byrja, er kr. 950.000,- v. kom. mvg.

Konto 8115 er ovbyrjað og kann væntast at hava stórt hall við ársenda, um øll arbeiðini skulu fremjast.
Vísandi til omanfyrinevnda verður mælt til, at avlopið av omanfyri nevndu verkætlan á kr. 891.433,- verður flutt á konto 8115.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81044 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux | 8115 | | vegir o.a. planlegging | | 891.433,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 891.433, verður flutt av løgukonto L81044 Vegagerð á íðnaðarøkinum við Kemilux á rakstrarkonto 8115 fyri vegir o.a. planlegging, og at verkætlanin Vegagerð á íðnaðarøkinum við Kemilux verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 255/23 Umsókn um broyting av byggisamtyktini soleiðis, at matr. nr. 132c, Kollafirði verður broytt frá D1-øki til sama øki sum matrikklarnir niðan fyri hava

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 155/23 | 23/04334-3 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2023 | 4/23 | 23/04334-3 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 255/23 | 23/04334-3 |

**Upprunin til málið**
Eigararnir av matr. nr. 132c, Kollafjørður, hava søkt um at broyta byggisamtyktina fyri ognina frá D1 øki til sama øki sum matriklarnir niðanfyri. Økið niðanfyri er ávegis at verða broytt til eitt C3 øki.

**Lýsing av málinum**
Í gomlum kortskjølum sæst, at matr. nr. 132c, Kollafjørður lá sum B - byggiøki til almenn endamál í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sum var galdandi frá 1978-1990. Byggiloyvið til sethúsini á ognini varð givið í 1981, altso meðan økið hevur verið ætlað bygging til almenn endamál. Tá byggiloyvið varð givið, gav Yvirfriðingarnevndin somuleiðis loyvi til byggingina.

Uml. ár 2003 vórðu fleiri broytingar gjørdar í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, og varð hon løgd undir ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ein av broytingunum var, at matr. nr. 132c, Kollafjørður, varð broyttur frá at liggja sum B – byggiøki til almenn endamál til D1 – øki til almenn endamál, har ikki ber til at byggja. Eigarar greiða frá, at teir ikki hava verið kunnaðir um hesa broyting, og at teir ikki fyrr enn fyri stuttum hava sæð, at ognin liggur í D1 øki.

Av tí at sethúsini eru bygd við øllum neyðugum loyvum, og at byggisamtyktin fyri ognina er broytt, uttan at eigarar hava verið varugir við tað, verður tað mett hóskandi, at byggisamtyktin fyri ognina verður broytt til byggiøki aftur. Økið niðanfyri ognina liggur í løtuni sum C2-miðstaðarøki, serliga ætlað stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum og øðrum mentanarligum stovnum, men uppskot liggur til góðkenningar hjá Umhvørvismálaráðnum um at broyta byggisamtyktina fyri økið til C3-miðstaðarøki, ið er ætlað miðstaðarbygging og íbúðum, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð*. Tí verður tað mett best hóskandi, at matr. nr. 132c somuleiðis verður broyttur til at liggja sum C3-miðstaðarøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru:
- Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.
- Bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað økið.

Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini eru:
- Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging og íbúðir.
- Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð* – journal nr. 22/00463.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 132c, Kollafjørður, verður broytt frá D1 øki til C3 øki, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2023:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 256/23 Broyting av almennu byggisamtyktini - áseting um minstu grundstykkjavídd til tvíhús í A1 økjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 156/23 | 23/05440-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 256/23 | 23/05440-1 |

**Upprunin til málið**
Sethúsagrundstykki í A1 økjum skulu vera í minsta lagi 500 m$^2$. Vanlig mannagongd hevur verið, at grundstykkini til tví- og raðhús í A1-sethúsaøkjum, kunnu vera niður í 300 m$^2$ fyri hvønn partin av tví- ella raðhúsunum, um serloyvi verður givið.

Grundað á ásetingina í almennu byggisamtyktini loyvir matrikulstovan ikki longur sundurbýti av tví- og raðhúsastykkjum, sum eru minni enn 500 m$^2$, uttan so at serstøk byggisamtykt er gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum**
Ásetingin fyri minstu grundstykkjavídd í A1 økjum í almennu byggisamtyktini hevur verið soljóðandi frá 2012-2023:

*Kap. IV, § 5, stk. 2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m$^2$. Tá bygging verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m$^2$, tó í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús og 300 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsu,. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.*

Í sambandi við endurskoðanina av almennu byggisamtyktini, sum varð góðkend 11. september 2023, er hendan ásetingin koyrd í tvey, men hevur sama endamál:

*Kap. II, § 5, stk. 3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m$^2$.*

*Kap. II, § 5, stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini eru minni enn 500 m$^2$, tó í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús og 300 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.*

Hóast tað ikki er í samsvari við ásetingarnar, so hevur Tórshavnar kommuna umsitið ásetingina soleiðis, at man hevur kunnað givið serloyvi til tví- og raðshúsagrundstykki, sum eru niður í 300 m$^2$ fyri hvønn partin, uttan at serstøk byggisamtykt er gjørd.

Matrikulstovan hevur inntil nú loyvt sundurbýti av tví- og raðhúsum í A1 øki uttan serstaka byggisamtykt, men er nú farin at umsita loyvini í samsvari við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, og loyvir tí ikki longur sundurbýti av tví- og raðhúsum í A1 økjum, uttan at serstøk byggisamtykt er gjørd fyri økið.

Umsitingin metir tað verða hóskandi og neyðugt at broyta ásetingarnar fyri minst loyvdu grundstykkjavídd til tví- og raðhús smb. niðanfyristandandi, soleiðis at tær verða í samsvari við umsitingina av loyvunum seinastu árini:

*Kap. II, § 5, stk. 3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m$^2$* ***fyri stakhús og 300 m$^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki.***

*Kap. II, § 5, stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini* ***til stakhús*** *eru minni enn 500 m$^2$, tó í minsta lagi 400 m$^2$* ~~*fyri stakhús. og 300 m$^2$ fyri hvønn*~~

**~~partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.~~**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini áðrenn broyting eru m.a.:
Kap. II, § 5,
Stk. 2. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$.
Stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

Uppskot til broyting av ásetingunum í almennu byggisamtyktini kap. II, § 5, stk. 2 og 11:
Kap. II, § 5,
Stk. 2. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
Stk. 11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05440-2 Broyting av ásetingum fyri A1 øki

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av ásetingunum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini sambært skjalinum *Broyting av ásetingum fyri A1 øki,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 257/23 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri røktarheim á Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 159/23 | 23/05639-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 257/23 | 23/05639-1 |

**Upprunin til málið**
Í mars 2023 varð vinnandi uppskotið til nýtt røktarheim á Stórubrekku funnið, sí skjal *EYA+CUBO Røktarheimið á Stórubrekku A3 mappa_low res*. EYA vann og síðani hevur ein tilgongd verið millum umsitingina, ráðgevan v.m. um at tillaga uppskotið nakað, og er ætlanin nú komin so langt, at klárt er at gera serstaka byggisamtykt fyri økið.

Røktarheimið skal byggjast á matr. nr. 138a, Hoyvík og er áleið 50.000 $m^2$ til støddar, sí skjal *Byggiøki*. Byggingin er áleið 6.700 $m^2$ netto. Økið liggur sum D3 øki, ætlað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkum, og øll útstykking og bygging skal skipast í serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
Røktarheimið fevnir um 64 búpláss, 16 røktaríbúðir og dagtilboð til 50 eldri heimabúgvandi, hevur stórkøk, vaskarí, fysioterapi og ergoterapi.

Yvirskipaða hugmyndin er ein samanseting av minni húsum við íblástri úr føroysku sethúsunum, har samanseting og samanbygging av húsum í ymsum hæddum og rættningum gera smá vard útirúm og tún.

Staðsetingin er á høvdini, miðskeiðis í byggifeltinum, sí skjal *Støðumynd, kappingaruppskot*. Byggingin tekur atlit til lendisviðurskiftini í økinum og spælir við og gevur til lendið, samstundis sum hon háttar seg eftir veðurlagnum. Byggingin leggur seg á heyggin og skipar og háttar seg við endamálinum at geva búfólkum og starvsfólkum best møguligt útsýni.

Atkoman til økið er norðanífrá og er íbundin Klingruna. Parkering er ætlað móti beninum og í lummum sunnarlaga á økinum. Tal av parkeringsplássum í økinum verður í minsta lagi 1,0 pláss pr. 75 $m^2$ húsavídd.

Í høvuðsheitum er byggingin skipað í 2 hæddum, hæddirnar eru sum vístar á skjalinum *Hæddir.*
Byggistigið og nýtslustigið er í mesta lagi tað, sum loyvt verður í D3 økjum.

Endaliga dispositiónsuppskotið til røktarheimið verður handað av ráðgevunum 5. oktober 2023, og verður endaliga uppskotið til serstaka byggisamtykt gjørt sambært hesum, men megintættirnir eru sum lýstir omanfyri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini:
Kap. II, §19.

1. Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,25.
4. Nýtslustigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum,* journal nr. 17/03196.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *EYA+CUBO Røktarheimið á Stórubrekku A3 mappa_low res,* journal nr. 23/05639-2.
- *Støðumynd, kappingaruppskot,* journal nr. 23/05639-3.
- *Hæddir,* journal nr. 23/05639-4.
- *Byggiøki,* journal nr. 23/05639-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstøk byggisamtykt fyri røktarheimið á Stórubrekku verður gjørd sambært ætlanini, sum lýst omanfyri, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

## 258/23 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |
| 51 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 73/19 | 14/03408-18 |
| 52 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 61/19 | 14/03408-18 |
| 53 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 36/19 | 14/03408-18 |
| 54 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 249/19 | 14/03408-18 |
| 55 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 235/19 | 14/03408-18 |
| 56 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 205/19 | 14/03408-18 |
| 57 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 57/20 | 14/03408-18 |
| 58 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 45/20 | 14/03408-18 |
| 59 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 34/20 | 14/03408-18 |
| 60 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 102/20 | 14/03408-18 |
| 61 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 331/20 | 14/03408-18 |
| 62 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 142/20 | 14/03408-18 |
| 63 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 111/20 | 14/03408-18 |
| 64 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 121/20 | 14/03408-18 |
| 65 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 307/20 | 14/03408-18 |
| 66 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 266/20 | 14/03408-18 |
| 67 Fíggjarnevndin | 26.11.2020 | 321/20 | 14/03408-18 |
| 68 Fíggjarnevndin | 01.12.2020 | 322/20 | 14/03408-18 |
| 69 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 337/20 | 14/03408-18 |
| 70 Mentamálanevndin | 09.12.2020 | 337/20 | 14/03408-18 |
| 71 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 292/20 | 14/03408-18 |
| 72 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 20/21 | 14/03408-18 |
| 73 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 47/21 | 14/03408-18 |
| 74 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 70/21 | 14/03408-18 |
| 75 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 249/21 | 14/03408-18 |
| 76 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 292/21 | 14/03408-18 |
| 77 Trivnaðarnevndin | 05.10.2023 | 48/23 | 14/03408-18 |
| 78 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 272/23 | 14/03408-18 |
| 79 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 258/23 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 m$^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 m$^2$ og 20.000 m$^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum. Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.
**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m$^2$ |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m$^2$ |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m$^2$ |
| Tilsamans | | 35.819 m$^2$ |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m$^2$ fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m$^2$ = 11.900 m$^2$ til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m$^2$.

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m$^2$ til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m$^2$ til 42.395 m$^2$.

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.
**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.
**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.
**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.
**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.
**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at inngnaga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.
**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.
**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.
**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.
**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.
***Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.*

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á*

*áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*
**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.
**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum<br>(eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála

og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.
**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.
**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.
**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.
**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð. Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.
Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn.
Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.
Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.
Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.
Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.
Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.
Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".
**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

**Ískoyti:**
Viðv. broyting av takbelegningi
Innanhýsis stýrisbólkurin og Stýrisbólkurin fyri skúlan á Fløtum hevur eftir áheitan frá Húsaumsitingini viðgjørt spurningin um, hvørt tað er betri at brúka takpapployson ístaðin fyri takmembran (takdúk) á tekjuni á oyggjunum (omaná bygningunum 1-7, tó ikki miðøkið). Takpapp er minni viðbreki fyri herverki, skaðum v.m., umframt nakað høgligari at røkja og viðlíkahalda.

Meirkostnaður fyri at skifta frá membrani til papp er 4.056.754 kr. + kommunalt MVG. Innanhýsis stýrisbólkurin mælir til at broyta takbelegningin til takpapp. Í mun til verkætlanina er broytingin at rokna sum eitt tilkeyp og kann tí ikki fara av puljuni til ókent og eiheldur er rúm fyri hesi íløgu á øðrum kontum í verkætlanini. Tí er neyðugt at økja samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina við hesi upphædd.

Ætlandi verður byrjað at leggja takpapp í mars 2019 og tekur tað arbeiðið nakrar mánaðir.

Viðv. innbúgvi og uttandura økið
Sum greitt frá í framløgu í sambandi við viðgerðina í nevndini á sumri 2018 er greitt, at áður gjørd meting í 2016 um kostnaðin av hóskandi innbúgvi v.m. ikki heldur í mun til tað, sum nú verður mett rímiligt. Á fundinum verður innleiðandi greitt frá metingini og atlitunum í málinum. Á einum komandi fundi kemur endalig tilráðing um málið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at leggja takkpapp á bygningin í staðin fyri membran, og í hesum sambandi at hækka samlaða løgukarmin fyri byggiverkætlanina við 4.056.754 kr. + kommunalt MVG at fíggja yvir løgujáttanina í 2020.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 28. februar 2019**: Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 90.000 tkr til verkætlanina, umframt framflyting frá 2018 á 21.970 tkr. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á umleið 110.000 tkr í 2019 til arbeiðstakarar, ráðgevar og byggiharraveitingar og -útreiðslur. Á framflutta løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar eru 18.099 tkr. tøkar., ið tørvar at vera flutt á projektkontuna L41012 Skúlin á Fløtum.

Ískoyti viðv. játtan til innbúgv v.m.

Tekstur er ávegis

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 18.099 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 116.000 tkr til verkætlanina. Á projektkontuni L41012 Skúlin á Fløtum er væntað meirnýtsla á uml. 5 mio.kr. í 2019 (ikki endaliga uppgjørt enn!). Hetta vegna at tað hevur gingið væl at byggja í 2019.

Støðug gongd er á verkætlanini, ið ætlandi endar í ár. Tilgongdin viðv. útboð av innbúgvi og øðrum byggiharraveitingum er farin í gongd og kemur tann spurningur væntandi fyri aftur til viðgerðar í mars 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at játta 116.000 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sbrt. galdandi samtykt hevur verkætlanin 394,8. mio.kr. í játtan. Ætlandi verður byggingin avhendað 26. juni 2020.

Í hjálagda skjali verða lýst útlitini fyri, um samlaða játtanin fer at halda. Niðurstøðan er at í løtuni verður mettur tørvur á meirjáttan svarandi til uml. kr. 5-8 mió.kr.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin gera vart við møguligan tørv á meirjáttan at nágreina til ein komandi fund.
**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Byggingin av Skúlanum á Fløtum líður væl. Útboð av føstum og leysum innbúgvi hava verið, umframt útboð av KT-skíggjum til floks- og fakstovur. Sum áður kunnað um, hevur kostnaðarmetingin til innbúgv og útgerð, harundir útiútgerð, verið ov tepur.

Orsøkin er millum annað tilkeyp av ídnaðarkøki og skilaveggi í ítróttahøllini, umframt ov lítið er sett av til aktiva útgerð (kt), innbúgv sum heild og ráðgeving til hesar byggiharraveitingarnar.

Sáttmálar stunda til at verða undirskrivaðir, so at innbúgv og útgerð kann verða sett upp sambært tíðarætlanini.

Mett verður, at neyðugt er við kr. 6,82 mió í eykajáttan til innbúgv og útgerð. Greitt verður neyvari frá hesum á fundinum.

Fyrisitingin hevur ikki fígging at vísa á, men vísir á møguleikan við lántøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og verkætlanarleiðarin mæla til at játta kr. 6,82 mió til innbúgv og útgerð til kontu 4176 Nýbygging skúlan L41012 Skúlin á Fløtum um neyðugt fíggjað við lántøku.
**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass g Gunvør Balle, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð, tó tekur minnilutin ikki undir við at fíggja útreiðsluna við lántøku og mælir til at finna peningin innanfyri verandi íløgukarm.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Heðin Mortensen, Helelna Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð og fíggja útreiðsluna innanfyri verandi íløgukarm.

Uppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystaø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Borgi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 7 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 3 blonkum**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tróndi Sigurðsson, Heðin Mortensen, Helelna Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð og fíggja útreiðsluna innanfyri verandi íløgukarm.

Uppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Borgi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við aðruviðgerð við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 1 blankari atkvøðu**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Halla Samuelsen.
**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Kunnað varð um málið.
**Fíggjarnevndin 26. november 2020:** Kunnað varð um málið.
**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Seinasta hálva árið er nógv orka løgd í at fáa stóru skúlabygningina Skúlan á Fløtum lidna – nú umleið 58 mánaðir eftir, at sáttmáli var inngingin við ráðgevarasamtakið EIND Í/F sum høvuðsráðgeva um at projektera bygningin - eindirnar í heildini.

2. november 2020 fluttu næmingar og starvsfólk skúlans og frítíðarskúlans inn í bygningin, og 3. november 2020 var hátíðarhald og opið hús fyri almenninginum.

Í so stórari og umfatandi verkætlan eru hópatals viðurskifti og tilgongdir við eini longri røð av ráðgevum, arbeiðstakarum, veitarum og áhugapørtum. Sum heild metir umsitingin, at verkætlanin hevur gingið rímiliga væl, tó høvi er fyri batum í nøkrum førum, og hevur nógv orka verið løgd í at hava eina stundisliga og dygga verkætlanarstýring. Í januar/februar 2021 er ætlanin at hava eina eftirmeting av verkætlanini, bæði í stýrisbólkinum og innanhýsis í umsitingini, og eftirmetingin verður løgd við, tá verkætlanin skal lokast.

Samstundis er greitt, at áhugamálini, herundir serliga tey fíggjarligu, hjá ymisku pørtunum ikki altíð eru tey somu og ymiskt er, hvussu fatanin er av tilgongdunum. Høvuðsgrundarlagið fyri samstarvinum um ráðgeving og bygging er partalagssáttmálin, ið var undirskrivaður 17. november 2016, og tilhoyrandi høvuðsráðgevaraavtala (sbrt. ABR89) og høvuðsarbeiðstøkusáttmáli frá apríl 2017(sbrt. ABF06). Í hesum skjølunum eru ásetingar og fyriskipanir um, hvussu ymisku viðurskiftini í verkætlanini skulu handfarast, herundir ásetingar viðv. handfaring av ósemjum. Umsitingin hevur hesi árini lagt nógv orku í at greiða mál og ósemjur so hvørt, og var m.a. á sumri 2018 gjørd ein rímiliga umfatandi broyting/ískoytissáttmáli til partalagsavtaluna fyri at fáa greið fíggjarlig viðurskifti partanna millum. Hesi árini eru gjørd trý siffra tal av ATR-skjølum við ráðgevar og avtaluseðlum við høvuðsarbeiðstakaran. Alt við støði í galdandi sáttmálum.

Í apríl 2020 byrjaði høvuðsarbeiðstakarin Articon-Búsetur Í/F (A/B) at gera galdandi, at felagið metti seg hava krav móti byggiharranum m.a. fyri drál hjá høvuðsráðgevanum í sambandi við útvegan av tekningum í verkætlanini og at tað hevði viðført eyka útreiðslur fyri felagið fleiri ár aftur í tíð, viðurskifti, ið felagið ikki hevði gjørd vart við áður. Hesum er høvuðsráðgevin heilt ósamdur í, og umsitingin sum heild er eisini ósamd í tí (við nøkrum undantøkum) og metir, at kravið frá A/B kemur alt ov seint til at kunna vera tikið við

nú. Harumframt er A/B ónøgd við byggiroknskapin í verkætlanini, har tað vísir seg at vera ávís ógreiða um handfaring av einum posti.

Síðani tá hava verið ein longri røð av fundum bæði í stýrisbólkinum og aðrir samráðingarfundir millum leiðsluna í A/B og verkætlanarleiðsluna hjá TK og til tíðir eisini EIND, har roynt hevur verið at fáa yvirlit yvir páhaldini hjá A/B og annars at fáa gjørt verkætlanina upp, samstundis hevur verkætlanarleiðslan hjá TK saman við byggileiðsluni samskift við A/B og høvuðsráðgevan um at fáa avklárað, gera avtalu um restspurningar og fáa seinastu viðurskiftini avkláraði, uppgjørd og greidd. Í verandi støðu fyriliggur ikki ein sluttuppgerð og endaligur byggiroknskapur, men er væntandi, at uppgerðirnar vera klárar innan stutta tíð. Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá hesum.

Annar høvuðsspurningur, ið hevur verið frammi, er dagurin fyri avhending. TK metir, at avhending var 17. sept 2020, meðan A/B metir, at bygningurin ikki er avhendaður enn og metir seg eiga skotbráð fram til fyrst í 2021. Sbrt. byggirættinum metir umsitingin og byggileiðslan, at bygningurin var avhendaður í september 2020. Í tíðarskeiðnum frá avhending 2020 til nýtslutøkuna hevur A/B avgreitt eitt 4 siffrað tal av manglum. Sum heild verður mett, at bygningurin er væl úr hondum greiddur.

A/B hevur ynskt, at málið um staklutir í sluttuppgerðini og avhendingarviðurskiftini skulu leggjast fyri ein atstøðumann sbrt. partalagssáttmálanum. Fundur kann verða í næstum at velja ein slíkan. Um annar parturin er ónøgdur við úrskurðin hjá hesum ber til at leggja fyri gerðarrættarmál.

Útyvir høvuðsarbeiðstøkuna og høvuðsráðgevingina er ein longri røð av útreiðslupostum. Hesir eru um at vera liðugt uppgjørdir og kemur umsitingin at greiða nærri frá tí á fundinum.

Verkætlanarbúskapur

Høvuðsarbeiðstøkan
Byggiroknskapurin fyri høvuðsarbeiðstøkuna er um at vera liðugur. Eftir stendur at A/B hava sett fram krøv um gjald fyri yvirtíð, og mistar ordrar og umframt er ósemja um uppgerðina av byggiplássinum, rekkverki og onnur smærri viðurskifti. Hartil kemur spurningurin um longda byggitíð, ið vil ávirka postin fyri byggipláss, umframt ávís ósemja um uppgerð av index tí A/B ikki vil taka hædd fyri at felagið fekk forskot í verkætlanini 20 mio.kr, ið síðani stigvíst var sett niður so hvørt acontoumbønir vóru avgreiddar. Hartil metir felagið seg hava rætt til tíðarinsitament, tí felagið metir seg hava latið bygningin til tíðina havandi í huga umstøður, ið tey meta liggja hjá byggiharranum og høvuðsráðgevnum. Harumframt metir A/B seg ikki skula rinda negativt insitament sambært ásetingum í partalagsavtaluni vegna viðurskifti byggiharrans og høvuðsráðgevan.

Í hjálagda skjali (verður hendað á fundinum) er ein uppseting av fíggjarligu støðuni har tað sæst, hvørja meting umsitingin hevur av støðuni, umframt uppskot frá A/B til semju. Eisini framgongur ávegis uppgerð av øðrum útreiðslum byggiharrans.

Høvuðsráðgevingin
1. desember 2020 sendi høvuðsráðgevin EIND Í/F hjálagda skriv til endaliga semju um teirra veiting. Lagt verður upp til at TK rindar 585 tkr. sum endaliga semju, tá krevur ráðgevin fult gjald fyri nøkur ATR-skjøl, umframt at frítikin fyri at rinda negativt insitatmet sbrt. galdandi partalagsavtalu, umframt ikki taka við krøvum frá TK um ávís projekteringsmistøk. Samstundis gera ráðgevin vart við, at um TK ikki ger semju, gera teir onnur og hægri krøv galdandi. Viðurskifti sum umsitingin sum heild metir ikki eru rímilig og haldbar.

Meting viðv. víðari gongdini
Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá metingum kring krøvini. Umsitingin metir sum heild at málini kring EIND eiga at vera greinaði nakað betri og lata tilgongdina við samráðingum ganga nakrar vikur afturat.

Aðrar útreiðslur byggiharrans

Sbrt. hjáløgdu uppgerð sæst støðan. Talan er um staðfestar útreiðslur, ið stórt sæð eru um at vera endaligar. Væntandi eru hesar útreiðslurnar endaliga uppgjørdar í mars 2021.

Samanumtikið
Talan er um eina ógvuliga samansetta støðu og vil umsitingin taka støði í uppgerðini sum hon sær hana. Samstundis er greitt, at A/B hevur eina uppgerð, sum á fleiri økjum víðkir frá. Alternativið til eina semju er fyrst at partarnir velja ein ástøðumann, og um tað ikki ber á mál, so fáa gerðarrætt at meta um og taka støðu til ósemjurnar. Útfallið av slíkari tilgongd vil hava ávísa óvissu fyri báðar partar, umframt fíggjarliga kostnaðir til fyrireikingar, fundir, ráðgevaraútreiðslur og gerðarrættin. Av tí at tað hava verið samráðingar í rúma tíð og av tí at A/B krevur ástøðumann, má sum heild metast, at í hesum umfari eru samráðingarmøguleikin um at vera úttømdur. Viðurskiftini í mun til høvuðsráðgevan eru helst øðrvísi og kunnu lutvíst viðgerast fyri seg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka støðu til kravið frá A/B um semju ella um farast skal víðari við at velja ástøðumann sbrt. galdandi partalagssáttmála
b). at umsitingin heldur fram við samráðingunum við Eind sbrt. galdandi partalagssáttmála
c). at umrøða fyribils uppgerðina av øðrum útreiðslum byggiharrans.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við b) og c) í tilmælinum og útseta a).
**Mentamálanevndin 09. desember 2020:** Oyvindur Brimnes, spf. Ráð, greiddi frá.

Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at gera semju við Articon/ Búsetur og Eind og at taka undir við at játta kr. 21,8 mió. eyka til verkætlanina. Henda játtan er treytað av at Articon/Búsetur og Eind góðtaka semju og at semjan er endalig. Upphæddin verður fíggjað av meirinntøkum 2020.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at framhaldandi semjusøking verður gjørd og í øðrum lagi at velja ástøðumann sbrt. galdandi partalagssáttmála.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.
**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, fýra ímóti og tveimum blonkum at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø.

Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Til kunningar verður sagt frá, at semjan er undirskriva.
**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Kunnað varð um málið.
**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Samráðingar hevur verið við høvuðsráðgevaratoymið EIND Í/F um endauppgerð. Komið er ikki mál enn, tí ósemja er enn millum partarnar. Víst verður í hesum sambandi eisini til undanfarna viðgerð av ósemju

við høvuðsarbeiðstakaran Articon-Búsetur Í/F, sí omanfyri, harímillum sáttmálaásetingar um handfaring av ósemjum.

EIND ÍF krevur nú semju, har:
1. At parturin hjá EIND Í/F í negativa insitamentinum dettur burtur.
2. At parturin hjá EIND Í/F í negativum avtaluseðlum/projekteringsfeilir dettur burtur.
3. At goldið verður fyri gjørd arbeiði í sambandi við listprýði og innbúgv og útgerð (*ATR-skjal 15, 17, 18, 27, 41 og 44), áljóðandi kr. 585.070,79.
4. At goldið verður fyri ráðgeving (einki ATR-skjal) í sambandi við akustik og eyka goymsluskúr kr. 182.709,00.
5. Kreditnota um prosjekteringsleiðslu kr. -150.913,00. (áður útgoldið forskot).
6. Givið verður avslag í samband við møguliga semju kr. -200.000,00
7. At onnur krøv frá EIND Í/F fella burtur, uttan so at Tórshavnar kommuna hevur umbiðið arbeiðið.

*ATR merkir ískoytisavtala til høvuðssáttmála um ráðgeving

Umframt nevndu upphædd vísir EIND á, at tvey sáttmálagjøld (rata 5-20 og 6-20) eru afturhildin, samlað upphædd kr. 481.350.

Samlað upphædd fyri semju er sambært hesum kr. 898.216,79 u/mvg. Sí annars skjal.

Í sambandi við samráðingar við arbeiðstakara á heysti í 2020 boðar EIND TK frá, at tey hava krøv á kr. 586.000 krónur. Nú er kravið kr. 898.216,79 u/mvg. TK hevur einki arbeiðið umbiðið frá EIND Í/F síðani fyrra kravið.

Byggiharrans mótkrøv:
Samráðingar hava verið í drúgva tíð við EIND Í/F, og umsitingin metti seg hava semju á fundi fyri summarfrítíðina 2021. Semja var m.a. um útreiðslur fyri kr. 437.622, sum stavaða frá mistøkum, ið EIND beinleiðis er orsøk til. Onnur krøv uppá kr. 653.770 er ikki liðugt at samráðast um. Fleiri teirra metir umsiting eru ráðgevaramistøk. (sí hjálagt skjal).

Í sambandi við nýtsluloyvið hava myndugleikar víst á fleiri manglar í prosjektinum. Eitt nú er ein taktrappa og fleiri hurðar, sum ikki eru rætt prosjekteraðar, og sum kommunan má keypa inn av nýggjum fyri uml. kr. 200.000.
Samanumtikið er metingin hjá umsitingini at byggiharrin hevur størri krøv móti ráðgevum enn ráðgevarar móti byggiharra.
Fyrr í summar var viðgerð av spurninginum um semju við EIND Í/F viðgjørdur í innanhýsis stýrisbólki á Fløtum. Heimilað var umsitingini at gera semju við ávísum fyritreytum. Hildið var fyrr í summar, at tilboð frá TK um eina null loysn var eitt sera gott tilboð, men hesum tók EIND Í/F tó ikki undir við.
Viðvíkjandi ymsu ATR skjølunum, so er talan um seinkaðar veitingar og ikki ikki lidnar veitingar, sum hava kostað kommununi útreiðslur. Í øðrum førum er talan um arbeiði, sum einki ATR skjal er avtala uppá, og slíkt skal avtalast áðrenn útreiðslur verða settar í gongd, er ein meginregla í avtalugrundarlagnum. Í tveimum førum eru ATR skjøl goldin (41 og 44).

Viðvíkjandi afturhildnu sáttmálagjøldunum metir umsitingin, at ráðgevararnir hava ikki veitt ta tænastu og tilfar sum sáttmálin ásetir. Partur av hesum er at brunaprojektið er ikki liðugt, og at kommunan hevur ikki fingið “as built tekningar og tilfar”. Farið er nú langt út um tíðarfreistir við hesum.

Ráðgevaratoymið hevur harumframt afturhildið tilfar, sum skal til fyri at fáa m.a. nýtsluloyvi. At halda aftur tilfar, tí ósemja er um fíggjarlig viðurskifti, er ikki heimilað sambært ráðgevarasáttmálanum. Ósemjan hevur gjørt, at kommunan verður noydd at keypa uttanhýsis ráðgeving, skal skúlin fáa endaligt nýtsluloyvi.

Um semja, sum EIND Í/F krevur, verður gjørd, so hevur hetta fíggjarligar avleiðingar fyri fíggjarstøðuna í prosjektinum, men ilt er at meta um, hvussu týðandi hetta verður viðvíkjandi møguligum nýggjum fíggjartørvi. Umsitingin greiðir á fundinum frá fíggjarstøðuni á verkætlanini og atlit í hesum sambandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til kravið frá EIND ÍF um semju og gjald kr. 898.216,79 u/mvg ella um haldast skal fram við samráðingum og møguligum uppmanni sambært galdandi sáttmálum.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Nevndin samtykti at innganga endaliga semju á kr. 898.216,79 u/mvg við EIND, treytað av at alt manglandi tilfar verður latið kommununi. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.
**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir leggjast fyri nevnd og býráð at loka.

Ætlandi seinasti fundur í bygginevndini er hildin og eftirmeting er gjørd. Bygningurin fer hereftir endaliga frá eini verkætlan til eina rakstrareind.

Nú verkætlanin L41012 Skúlin á Fløtum skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt lítið hall á kr. 276.750. Fyri kortum komu rokningar frá eldri árum, sum man ikki hevur havt møguleika at taka hædd fyri. Burtursæð frá hesum, hevur eydnast sera væl at halda játtanina til byggingina av Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at loka verkætlanina L41012 Skúlin á Fløtum og flyta kr. -276.750 til løgukarm 41999. Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið.

**Trivnaðarnevndin 05. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

# 259/23 Víðkan av Skansabryggjuni - útbygging norðureftir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 14.02.2022 | 10/22 | 22/00638-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 97/22 | 22/00638-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 36/22 | 22/00638-1 |
| 4 Havnanevndin | 13.06.2023 | 17/23 | 22/00638-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 184/23 | 22/00638-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 238/23 | 22/00638-1 |
| 7 Havnanevndin | 03.10.2023 | 31/23 | 22/00638-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 277/23 | 22/00638-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 259/23 | 22/00638-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Núverandi útbygging av Skansabryggjuni og eystara havnaøki skuldi upprunaliga fevna um eitt øki á umleið 163.000 $m^2$. Útbyggingarætlanin varð tó tillagað og minkað niður í 95.000 $m^2$.

Nýggja havnaøkið minkaði við hesi tillaging sostatt umleið 68.000 $m^2$ í mun til upprunaligu ætlanina, og tað minkar sjálvsagt um nyttuna og møguleikarnar at skipa havnaøkið nøktandi í mun tey krøv og ynskir sum eru til farmaflutning og uttanlandssigling, serliga í framtíðini.
Ein onnur avleiðing av hesi broyting er eisini, at ætlanin at gera nýggjan til- og frákoyringarveg millum havnalagið og ringvegin ikki kundi fremjast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

<u>Umhvørvis-árinsmeting:</u>
Árinsmeting (VVM redegørelse), sambært § 21 í løgtingslóg um Havumhvørvi, varð gjørd útfrá tí upprunaligu útbyggingarætlanini á 163.000 $m^2$. Árinsmetingin lýsir m.a. grundarlagið og tørvin á útbyggingini, umframt árinini á umhvørvi og náttúru. Árinsmetingin varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar hin 26. juni 2014 (j.nr. 14/00893-7). Árinsmetingin fór síðani til almenna hoyring. Inn komu 7 hoyringsskriv, sum vórðu viðgjørd í "Hvítubók", ið varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar 4. mai 2015 (j.nr. 14/00893-12). Umhvørvisstovan sendi hin 30. juli 2015 Tórshavnar havn uppskot til góðkenning av árinsmetingini av upprunaligu útbyggingarætlanini (j.nr. 14/00893-13), men Tórshavnar havn boðaði hin 21. oktober 2015 Umhvørvisstovuni frá, at ætlanin nú var minkað munandi. Umhvørvisstovan góðkendi árinsmetingina hin 26. november 2015 (j.nr.14/00893-17), og Heilsu- og Innlendismálaráðið hevur seinni staðfest avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

<u>Fornminnismyndugleikin:</u>
Fornminnisnevndin, ið er tilmælandi nevnd hjá landsstýrismanninum í mentamálum í sambandi við friðing av fornminnum, varð kunnað um útbyggingarætlanina. Fornminnisnevndin kom við sínum viðmerkingum á fundi hin 12. juni 2013 (j.nr. 14/00894-1). Viðmerkingarnar snúðu seg í høvuðsheitum

um at varðveita sjóvarklettin niðanfyri Skansan, og at útsýnið av Skansanum út yvir nýggja pakkhúsøkið verður so frítt sum gjørligt út á sjógv.

Náttúrufriðingarmyndugleikin:
Náturðufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu viðmælti ætlanini í skrivi dagfest 7. januar 2014 (j.nr. 2013-02873/2 og j.nr. 14/01732-5).
Yvirfriðingarnevndin gav í skrivi dagfest 10. juni 2014 (j.nr. 14/01732-9) fyribils loyvi til havnaútbygging á ætlaða staðnum, tó við teirri treyt, at tilevning og útsjónd skuldu góðkennast endaliga í Yvirfriðingarnevndini.
Eftir ávísa almenna umrøðu av útbyggingini, fór í 2015 fram eitt ávíst samskifti og fundir við Yvirfriðingarnevndina viðvíkjandi hvussu treytirnar í fyribils loyvinum kundu lúkast, serliga viðvíkjandi bygningunum, ið skuldu standa framman fyri Skansan.
Í hesi tilgongdini sendi Mentamálaráðið, ið vegna Føroya Landsstýri varðar av Skansanum, Yvirfriðingarnevndini drúgt hoyringsskriv, ið mótmælti ætlanini (j.nr. 14/01732-19).
Viðgerðin av málinum í yvirfriðingarnevndini dró út, uttan at Yvirfriðingarnevndin kom til nakra niðurstøðu í málinum um upprunaligu útbyggingarætlanina.
Fyri at útbyggingin av Skansabryggjuni ikki skuldi fara fyri skeyti ella verða seinkað uppaftur meiri, avgjørdi Tórshavnar kommuna at tillaga útbyggingarætlanina soleiðis, at útfyllingin undir Skansanum bleiv tikin burturúr ætlanini, sum harvið minkaði úr 163.000 $m^2$ niður í uml. 95.000 $m^2$.
Hendan avgerðin varð fráboðað Yvirfriðingarnevndini 20. oktober 2015 (j.nr. 14-01732-20), og hin 23. desember 2015 varð endaligt loyvi til hesa minkaðu útbyggingarætlanina fingið frá Yvirfriðingarnevndini (j.nr. 14/01732-25).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 14/00893-7 : Árinsmeting
J.Nr. 14/00893-12 : Hvítabók

- J.Nr. 14/00893-13: Umhvørvisstovan – Uppskot til góðkenning av árinsmeting
- J.Nr. 14/00893-17: Umhvørvisstovan – Góðkenning av árinsmeting
- J.Nr. 14/00894-1 : Søvn Landsins – Fundarfrágreiðing við Søvn Landsins
- J.Nr. 2013-02873/2 og J.Nr. 14/01732-5: Viðmæli frá Nátturðufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu
- J.Nr. 14/01732-9: Yvirfriðingarnevndin: Fyribils loyvi
- J.Nr. 14/01732-19: Mentamálaráðið : Hoyringsskriv
- J.Nr. 14-01732-20: Tórshavnar Havn – fráboðan til Yvirfriðingarnevndina um minkaða ætlan
- J.Nr. 14/01732-25: Yvirfriðingarnevndin : Endaligt loyvi til minkaðu útbyggingarætlanina

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Havnarmeistarin mælir til, at farið verður undir at útvega neyðugu loyvini til at útbyggja Skansabryggjuna sambært upprunaligu ætlanini, og at neyðug fyrireikingararbeiðir kunnu verða gjørd í hesum sambandi.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at arbeiðið at byggja nýggju ídnaðarkeiina er komið væl áleiðis, og økið verður endaliga skipað í mun til ætlaða virksemið á økinum, er málið um víðkan av Skansabryggjuni aftur komið á dagsskrá. Ásannast má, at serliga til- og frákoyringin frá havnaøkinum ikki er nøktandi til nógva virksemið í økinum, umframt at nógva virksemið á økinum krevur enn meiri pláss.

Býarskipanardeildin hevur havt málið til umrøðu, og verður mett, at enn ein útbygging av havnaøkinum eigur at verða fyrireikað í tøttum samstarvi við allar áhugapartar. Tá núverandi útbygging var til politiska viðgerð fyri nøkrum árum síðani, tá var stór mótstøða ímóti útbyggingini, serliga í mun til Skansan og fornminnini kring Skansan.

Áðrenn endalig støða verður tikin til enn eina møguliga útbygging av havnaøkinum, verður mett neyðugt at ymisku atlitini verða neyvt lýst, soleiðis at tørvurin á útbyggingini verður væl grundaður. Somuleiðis fer býarskipanardeildin at mæla til, at skipað verður fyri einum tiltaki, har allir áhugapartar leggja síni sjónarmið fram fyri at tryggja eina góða og fakliga tilgongd í málinum.

**Útbygging av økinum uttanfyri Skansan**
Í øðrum býum er vanligt, at søguligir havnaskansar so líðandi verða innilokaðir so ella so av einum vaksandi býi. Her kann til dømis nevnast skansin í Bergen (Bergenhus), skansin í Halifax, Krongborg í Helsingør og Kastellet í Keypmannahavn.

Sí skjal Útbygging av økinum uttanfyri Skansan_25marts22.pdf, j.nr. 22/00638-10, sum sýnir dømir um innilokan av skansum í øðrum býum.

Í øllum hesum fordømum er dentur lagdur á, at søguligir skansar fáa ein nýggjan týdning í býarmyndini, har teir eitt nú gerast meira atkomuligir og miðsavnandi fyri kringliggjandi býarumhvørvið.

Á sama hátt kann tá hugsast, at um Skansin varð innigyrdur í einum hóskandi og virðiligum maritimum umhvørvi, kundi hann fingið ein nýggjan býarskipanarligan týdning fyri býin, har eitt nú Skansahellan kundi verið varðveitt í einum kyrrum bátahyli, og sostatt kundi verið nýtt meira enn hon verður í dag, av tí at her er nakað ábart og veðurhart.

Tað er tó týdningarmikið, at ein tílík ætlan fær serstakliga varliga býarskipanarliga viðgerð í samráð við eitt nú fornfriðingarmyndugleikar og náttúrufriðingarmyndugleikar, umframt at hetta fer í eina tilgongd við almennari hoyring.

**Heildarætlanin fyri Eystara havnaøki**
Ein útbygging av Skansabryggjuni norðureftir er ikki partur av heildarætlanini fyri Eystara havnaøki, sum varð samtykt í býráðnum 24. februar 2022.

Í teirri politisku viðgerðini av heildarætlanini hava viðmerkingar tó verið um, at ein til- og frákoyringarvegur uttan um Skansan út á ídnaðarøkið á nýggju keiini hevði lætt nógv um ferðslutrýstið ígjøgnum økið.

Sí Samtyktur Bóklingur_Heildarætlan fyri Eystara havnaøki_februar2022_full_res, *j. nr. 22/00638-8*

**Ferðsluteljingar í Eystara havnaøki**
Tað er viðkomandi at nevna í hesum samanhangi, at ferðsluteljingar vórðu gjørdar millum 16. - 22. aug. 2021 á høvuðsvegunum í Eystara havnaøki. Í hesum sambandi hevur tað serligan týdning at upplýsa, at miðalferðslan undir Skansanum út á ídnaðarøkið taldi 1.019 akfør um dagin. Hetta er eitt miðaltal, har bert gerandisdagarnir eru taldir við. Tá vikuskiftið eisini er talt við, eru í miðal 856 akfør um dagin.

Um bert tunga ferðslan er tald, eru 61 tung akfør í miðal gerandisdagar, og 51 tung akfør í miðal um dagin um vikuskiftið eisini er talt við.

Leggjast skal afturat, at hesar ferðsluteljingar taka ikki atlit til, nær mest ferðsla er í økinum, eitt nú tá Norrøna og onnur skip leggja at.
Her eigur tískil ein nýggj telјing at gerast, ið tekur hædd fyri hesum.

Sí viðheft skjøl við ferðsluteljingum út á ídnaðarøkið á keiini:

Ferðsluteljingar í Eystara havnaøki, *j. nr. 22/00638-7*
Nr. 4 osa.rapkoe_pkg - 2021-08-25T131029.045, j.nr. 22/00638-5
Nr. 4 Lastbilar osa.rapkoe_pkg - 2021-08-25T132340.983, j. nr. 22/00638-6

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at beina málið aftur í havnanevndina, og at býarskipanardeildin verður tikin við í tilgongdina, tá neyðug loyvir og verkætlanin eru nærri nágreinað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2023 er avsett 1,0 mió kr til verkætanina «Skansabryggjan – útbygging norðureftir».

**Tilmæli**
Virkandi havnarmeistari mælir til at játta 1,0 mió kr. til fyrireikingar og projektering av verkætlanini «Skansabryggjan – útbygging norðureftir», fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2023, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 13. juni 2023:** Ein meiriluti, Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Elsa Berg, tók ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Málið beint aftur í havnanevndina.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn vísir til tilmælið í havnanevndini 13. juni 2023.

**Havnanevndin 03. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóan Petur Eyðfinnur Johannsen, Birita Baldvinsdótir, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 260/23 Róðararfelagið Knørrur : Rokning fyri umprojektering av neysti í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 216/23 | 22/07206-15 |
| 2 Havnanevndin | 12.09.2023 | 27/23 | 22/07206-15 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 236/23 | 22/07206-15 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 218/23 | 22/07206-15 |
| 5 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 260/23 | 22/07206-15 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við verkætlanina at byggja bátahavn í Álakeri, varð samstundis arbeitt við at finna eina loysn fyri staðseting av nýggjum róðrarneysti til róðrafelagið Knørrur (RK), sum í 2017 hevði søkt Tórshavnar kommunu (TK) um høli ella grundstykki.

Í byggiprogramminum hjá Tórshavnar havn (TH) frá mai 2019 varð víst á økið sunnanfyri verandi neyst hjá Havnar Róðrarfelag (HR) sum grundøki til nýtt neyst hjá (RK).

Í 2020 og 2021 vóru samráðingar millum TK/TH og RK um møguligar staðsetingar av róðrarneysti í Álakeri. Endin av hesum varð, at RK fekk ávíst eitt øki á 750 $m^2$ í útsynningshorninum oman móti sjóvarmálanum í nýggja bátahhylinum.

Broytingin í verkætlanini varð samtykt í Havnanevndini, Fíggjarnevnd og Býráðnum 30. September 2021.

Leigusáttmáli um millum TH og RK um hetta økið varð samtyktur í býráðnum og undirskrivaður 28. Oktober 2021.

RK søkti tann 8. Mars 2022 um byggiloyvi til neyst, ið ByggiConsult hevði projekterað til grundøkið á 750$m^2$. Um hetta mundið setti HR fram ynski um eisini at fáa grundøki til neyst niðri við sjóvarmálan í nýggju bátahavnini í Álakeri. Samráðingar vóru millum TK, HR og RK um at HR eisini skuldi hava møguleika at byggja bátahøll niðri við sjóvarmálan í Álakeri. Hettar kundi lata seg gera, um bæði róðrarfeløgini fingu hvør sítt grundøki á áleið 600 $m^2$.

Á fundi hin 29. Juni 2022, ið RK hevur skrivað fundarfrásøgn frá, hevur m.a. spurningurin um kostnaðin fyri umprojektering verið viðgjørdur. RK hevur skrivað í fundarfrágreiðingina, at tað bleiv lovað, at TK skal gjalda fyri projektering til Arkitekt, El og VVS til nýggja neystið á grundøki á 600 m2.
Fyrrverandi havnarmeistarin, ið eisini luttók á fundinum, sigur hinvegin, at tað á hesum fundi ikki varð avtalað ella játtað, at TK skuldi gjalda fyri umprojektering, men at RK skuldi søkja kommununa um endurgjald/stuðul til umprojektering.

Endin av samráðingunum var, at havnanevndin hin 29. August 2022 tók undir við ískoyti til sáttmálan við RK um at minka grundøki hjá RK úr 750$m^2$ niður í 600 $m^2$. Ískoyti til sáttmálan var undirskrivað av TH og RK 14. Oktober 2022.

Á fundi hin 20. Desember 2022 í Ráðhúsinum hevur TK skrivað soleiðis í fundarfrágreiðinga frá fundinum (brot):

***"Til viðgerðar:***
*Jógvan Elias vísti á, at stykkið er minka frá 750 til 600 m2*
*Avtalað er:*
- *at drotturin verður fluttur*
- *at kommunan stoypir veggir 4 m upp*
- *at TK skal gjalda fyri umprojektering, tí nú er alt broytt*
- *at byggiloyvi skal útskrivast beinanvegin og at loysi skal verða til alt húsið.*

*(...) Knørrur vísir á fundarfrásøgn frá fundi 30. juni, har avtalað er:*
- *at kommununa skal gjalda fyri umprojektering ísv at stykkið nú er blivið minni, tað er kr. 500.000*
- *at Knørrur skal hava kr. 1,6 mió í stuðli frá kommununi, til dekkið og almenna túni. Avtalað er, at hetta verður sent til mentamálanevndina til at viðgera/avgreiða."*

ByggiConsult hevur vegna RK umprojektera neystið, og hevur sent rokning til Tórshavnar kommunu áljóðani kr. 563.750,- við MVG.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at rinda rokningina av konto 20910 Aðrar útreiðslur.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at hava fund við Róðrarfelagið Knørrur við atliti til at avgreiða málið.

Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Fundur hevur verið hin 23. august 2023 við Róðrarfelagið Knørr, sí fundarfrágreiðing, j.nr. 22/07206-20. Semja varð gjørd um, at Tórshavnar kommuna endurrindar Knørrafelagnum kr. 983.750,- sambært uppgerð fyri umprojektering og at gera dekk, treytað av góðkenning í viðkomandi nevndum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og stjórin í Tórshavnar havn mæla til at endurrinda Róðrarfelagnum Knørri kr. 983.750 vegna umprojektering av neystinum og at gera dekkið, og at hetta verður fíggjað av verkætlanini L74010 «Bátahylur í Álakeri».

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 261/23 Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2023 | 259/23 | 23/05027-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 223/23 | 23/05027-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 178/23 | 23/05027-2 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 05.10.2023 | 50/23 | 23/05027-2 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 17.10.2023 | 24/23 | 23/05027-2 |
| 6 Havnanevndin | 03.10.2023 | 35/23 | 23/05027-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 286/23 | 23/05027-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.10.2023 | 160/23 | 23/05027-2 |
| 9 Tekniska nevnd | 16.10.2023 | 50/23 | 23/05027-2 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.10.2023 | 49/23 | 23/05027-2 |
| 11 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 261/23 | 23/05027-2 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 26. oktober og aðru viðgerð 23. november.

**Lýsing av málinum**
**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2024**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2024 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 9.000 kr.
Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:

- lógarkrøv
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Mælt verður til eitt rakstrarútreiðsluhámark, so at rakstrarútreiðslurnar ikki økjast meira enn inntøkurnar. Hettar merkir nøkur átøk fyri at betra um úrslitið.

Í talvuni niðan fyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2023 | Blað nr.: 1083 | Formansins merki: |

| | | Rokskapur | Ætlan | Ætlan | Broyting 2023/2024 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.000 kr.** | | **2022** | **2023** | **2024** | **pct.** | **kr.** |
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 949.946 | 951.000 | 1.003.305 | 5,5% | *52.305* |
| 20601 | Felagsskattur | 68.221 | 60.000 | 60.000 | 0,0% | *0* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 740 | 1.000 | 1.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 182.831 | 191.862 | 209.773 | 9,3% | *17.911* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.659 | 36.421 | 35.954 | -1,3% | *-467* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.237.398** | **1.240.283** | **1.310.032** | **5,6%** | ***69.749*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 99.884 | 100.179 | 105.461 | 5,3% | *5.282* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 298.882 | 313.190 | 325.337 | 3,9% | *12.147* |
| §3 | Børn og ung | 224.266 | 225.921 | 238.923 | 5,8% | *13.001* |
| §4 | Undirvísing | 47.450 | 51.617 | 56.414 | 9,3% | *4.797* |
| §5 | Mentan og frítíð | 65.195 | 64.636 | 71.124 | 10,0% | *6.488* |
| §6 | Teknisk mál | 157.998 | 152.110 | 159.134 | 4,6% | *7.024* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 88.240 | 85.699 | 92.172 | 7,6% | *6.473* |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **981.916** | **993.353** | **1.048.564** | **5,6%** | ***55.212*** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -40.070 | -35.939 | -10,3% | *4.131* |
| | **Rakstur íalt** | **940.214** | **953.283** | **1.012.625** | **6,23%** | ***59.343*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 19.926 | 18.000 | 30.000 | 66,7% | *12.000* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.107 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **22.033** | **20.000** | **32.000** | **60,0%** | ***12.000*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **275.151** | **267.001** | **265.407** | **-0,6%** | ***-1.594*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 5.183 | 651 | 10.378 | 1494,2% | *9.727* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 12,5% | *561* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -3.682 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **8.865** | **5.633** | **15.421** | **173,8%** | ***9.788*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **266.286** | **261.368** | **249.986** | **-4,4%** | **-11.382** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **21.574** | 1648,3% | *20.340* |
| | **Avdráttir TH** | | **15.873** | **15.873** | 0,0% | *0* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **265.052** | **244.261** | **212.539** | **-13,0%** | **-31.722** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **223.350** | **225.046** | **197.516** | **-12,2%** | **-27.530** |

**Búskaparútlit**
Vøkstur er framvegis í føroyska búskapinum. Búskaparráðið hevur nýliga lagt heystfrágreiðingina fram, har ráðið hevur endurskoðað vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni fyri árini 2022 – 2024. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum verður mettur til at verða ávikavist 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024. Í ársins prísum vaks BTÚ sambært metingum uml. 10% í 2022, og roknar Fíggjarmálaráðið við, at hækkingin er eini 4-5% í 2023 og 2024. Nevnast kann, at arbeiðsloysið hevur verið søguliga lágt, og í juli mánaði í ár var arbeiðsloysið einans 0,7%.

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt í tíðarskeiðnum frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 vóru stórar hækkingar í prístalinum, og helt stóri prísvøksturin fram í 2022. Prísirnir vaksa framvegis, men spakuligari, enn teir hava tað seinasta árið. Seinasta meting frá Hagstovuni í 2023, vísur ein vøkstur í

brúkarapurístalinum á 4,4%. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkarapurístalið í 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir og rentuútreiðslur, sum hava gjørt seg galdandi.

Húsarhaldini hava sostatt upplivað stórar prís- og rentuhækkingar, men eru kortini bjartskygd sambært brúkarakanning hjá Hagstovuni. Sama støðan er ikki hjá vinnuni, har treystitalið er lækkað úr 17 í januar 2023 til 6 í juni 2023 og liggur undir langtíðarmiðalið.

**Inntøkurnar**
Inntøkurnar hjá kommununi hava verið á einum jøvnum stigi, og sær inntøkumetingin fyri 2023 út til at halda. Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur til at vera á sama støðið næsta ár.

Størsta inntøkukeldan hjá kommununi er kommunuskatturin. Mett verður at kommunuskatturin hækkar 5,5% sammett við fíggjarætlanina 2023. Inntøkurnar vaksa soleiðis við 52 mió. kr. frá 951 mió. kr. til 1.003 mió. kr.

Inntøkurnar av skatti av eftirlønarinngjøldum fyri 2024 eru mettar til 210 mió. kr, sum er 18 mió. kr. ella 9,3% hægri enn metta talið fyri 2023.

Inntøkan frá felagsskattinum er fyri 2024 mett at verða 60 mió. kr, ið er á sama støði, sum metingin fyri 2023. Felagsskatturin kann vera torførur at meta um, staðfesti felagsskatturin fyri 2022 var 68 mió. kr.

Samlaðu inntøkurnar í fíggjarætlanini fyri 2024 vaksa 69,7 mió. kr. ella 5,6% upp í 1.310 mió. kr. í mun til metingina fyri 2023 upp á 1.240 mió. kr.

**Rakstrarútreiðslurnar**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.300 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2022 til august 2023 við 1,3% ella 303 borgarum úr 23.013 upp í 23.315. Vøksturin er nakað lægri enn í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,2%.

Stóri fólkavøksturin seinastu árini hevur ført við sær eina munandi øking í virkseminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum. Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hevur við sær, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum, um verandi virksemi skal varðveitast.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2024 netto 55 mió. kr. upp í 1.049 mió.kr úr 993 mió. kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,6%, fyri Tórshavnar kommunu í mun til fíggjarætlanina fyri 2023. Við Tórshavnar havn, sum er inntøkufíggjað er vøksturin 6,2%

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðinum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 74% av nettokostnaðinum. Framskrivað er fyri kendar lønarhækkingar í 2024. Lønarhækkanin er mett til 3,8% í 2023 og 4,1% í 2024. Óvissa er um fíggjarætlanina 2024 í sambandi við lønarútreiðslurnar, í hesum uppskotinum er hædd ikki tikið fyri einum lønarlyfti og styttari arbeiðsviku.

Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 32,8 mió. kr. ella 4,6% í mun til fíggjarætlan fyri 2023. Av vøkstrinum fyri 2024 eru 21 mió. kr. lønarhækkingar í sambandi við sáttmálar.

**Prísvøkstur**
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki er framskrivaður, men hetta er tó gjørt fyri ávísar játtanir. Fyri dagstovnaøkið er tikið hædd fyri einum prístalsvøkstri á 4%.

Ein partur av inntøkunum hjá kommununi koma frá brúkaragjøldum. Gjøldini fyri barnaansingina verða dagførd árliga í sambandi við fíggjarætlanina. Gjøld á eldraøkinum eru dagførd sambært uppskotinum hjá kommunufelagnum.  Í uppskotinum eru flest onnur gjøld prístalsjavnaði við 4,4%

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
**Á §1 Kommunal fyrisiting økjast nettoútreiðslurnar 5,3% ella 5,2 mió.**
Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av lønarhækkanum  og prístalsjavningar í sáttmálum og lisensum. Kommunuval verður í 2024 og eru 1,2 mió. kr. settar av til endamálið.

**Nettoútreiðslurnar á §2 Almanna- og heilsumál økjast  við 3,93% ella 12,1 mió. kr.**
Játtanin til hvíldarheimið Naina lækkar við 397 t.kr. Játtanin tekur støðið í verandi útreiðslu.

Játtanin til kommunulæknatænastur hækkar við 880 t.kr. Talan er í høvuðsheitum um øktar leigukostnaðir og setan av einum kommunulækna afturat.

Integratión hækkar við 700 t.kr. játtanin er til flóttafólkasamskipara og tulk umframt rakstur.

Á sosiala økinum er ein framroknað nýtsla samsvarandi mettari nýtslu í inniverandi ári. Harumframt er ein játtan  á 500 t.kr. til fyribyrgingarverkaætlan sum byrjaði á vári 2023 og endar einast í 2024. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar á sosiala økinum økjast við 2,5 mió. kr.

Eldraøkið stendur fyri eini hækking í játtanini á 7,3 mió. kr. netto. Gjøld fyri búpláss, heimahjálp og umlætting eru dagførd sambært uppskotinum frá Kommunufelagnum um felags leist fyri áseting av gjøldum fyri árini 2023, 2024 og 2025.

**Nettoútreiðslurnar á §3 Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 5,8% ella 13,0 mió. kr.**
Játtanin til børn við serligum tørvi er økt við 2. mió. kr.
Foreldragjaldið er óbroytt 27%. Útreiðslurnar til systkinaavsláttur hække 500 t.kr. ella 3,1% mett út frá útreiðslum í 2023.

**Á §4 Undirvísing økjast nettoútreiðslurnar 9,3% ella 4,8 mió. kr.**
Játtanin fylgir metta næmingatalinum og er mett út frá framskrivingum.  Eisini er peningur settur av til Skúlanet.

**Nettoútreiðslurnar á §5 Mentan og frítíð økjast  við 10,0% ella 6,5 mió. kr.**
Hædd er tikin fyri øktum virksemi og hægri stuðulsjáttan. Stuðul til ítrótt og stuðul annars hækkar við tilsamans 2,35 mió. kr.

Langhylurin verður væntandi tikin í nýtslu í 2024, lagt er upp fyri hesum í rakstrinum. Játtanin til svimjihøllina hækkar í hesum sambandi við 1,9 mió. kr. Eisini hækkar játtanin til ítróttarannlegg við 1 mió. kr.

**Nettoútreiðslurnar á §6 Teknisk mál økjast  við 4,6% ella 7,0 mió. kr.**
Største játtanin á tekniska økinum er til umsiting og røkt av bygningum. Játtanin økist við 3 mió. kr. svarandi til 5,1% frá 60,5 mió. kr til 63,6 mió. kr.
Í uppskotinum er harumframt sett meira peningur av til Umhvørvistiltøk 905 t.kr. Vatnveiting 822 t.kr. og gøtuljós 720 t.kr.
9,5 mió. kr. eru settar av til vegir, hetta er ein øking á 1,3 mió. kr. Kontan kavarudding er dagførd soleiðis, at játtanin svarar til nýtsluna, játtanin økist við 1,3 mió. kr.

**Á § 7 Kommunal virki, frároknað Tórshavnar havn økjast nettoútreiðslurnar 7,63% ella 6,5 mió. kr.**
Renovatiónin hevur ein lítlan vøkstur í netto játtanini 1,7% ella  471 t.kr. Orsøkin er, at brúkargjøldini eru prístalsjavnaði í framskrivingini. Nettojáttanin til Sløkkiliðsstøðina økist við góðum 800 t.kr.

Bussleiðin hækkar við 1,9 mió. kr. samsvarandi sáttmála.

Samtykt er at veita 1 mió. kr. í stuðli til filmsverkætlanir, og hækkar játtanin til vinnuverkætlanir við hesi upphædd.

Játtanin til ferðavinnuna hækkar við 1,7 mió. kr. harav er 1 mió. kr. til MICE.

**Aðrar útreiðslur**
Stuðul til rentuútreiðslur hækkar úr 18 mió. kr. í 2023 til 30 mió. kr. í 2024. Orsøkin er, at rentan er hækkað seinasta árið og væntandi fer at hækka nakað aftrat í ár.

**Fíggjarstøðan**
Lániskuldin hjá kommununi er í alt 375 mió. kr. Av hesum eru 157 mió. kr. knýttar at Tórshavnar kommunu og 218 mió. kr. at Tórshavnar havn.

Innkomuvegurin verður fíggjaður við lántøku. Í juni tók kommunan eitt lán á 150 mió. kr. og roknað verður við at 130 mió. kr. verða tiknar aftrat í ár.

Rentuútreiðslurnar verða mettar til 15,4 mió. kr. í 2024. Afturgjald av skuld verður mett til 37,4 mió. kr. harav 21,6 mió. kr. í Tórshavnar kommunu og 15,9 mió. kr. í Tórshavnar havn.

Tøkur peningur hjá kommununi var seinast í august 196 mió. kr., 120 mió. kr. hjá Tórshavar kommunu og 76 mió. kr. hjá Tórshavnar havn. Samtykt er eitt minsta gjaldføri á 79 mió. kr. í Tórshavnar kommunu.

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður
úrslit áðrenn rentur 265.4 mió. kr. Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 250 mió. kr.
Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 197,5 mió. kr. Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina. Eitt skattaprosent verður mett til vera áleið. 55 mió.kr.

**Skjøl**
Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.
Yvirlit yvir gjøld

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið er**
23/05149 Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2024

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri
býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2023:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt.

**Havnanevndin 03. oktober 2023:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 05. oktober 2023:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 17. oktober 2023:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til 1. viðgerð.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóan Petur Eyðfinnur Johannsen, Birita Baldvinsdótir, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 262/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 154/23 | 23/00151-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 132/23 | 23/00151-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 186/23 | 23/00151-1 |
| 11 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 178/23 | 23/00151-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 255/23 | 23/00151-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 222/23 | 23/00151-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 287/23 | 23/00151-1 |
| 15 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 262/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Framlagt og góðkent.

# 263/23 Innkomuvegur – íbindingar o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.10.2023 | 51/23 | 23/03480-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.10.2023 | 293/23 | 23/03480-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 263/23 | 23/03480-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at sáttmáli er gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku av innkomuvegnum millum rundkoyringina við Hvítanes og Marknagil. Í hesum sáttmála eru optiónir til at gera rundkoyringar við Niðarahjalla og í Marknagili. Fyritøkan er somuleiðis biðin um tilboð um heildararbeiðstøkur av íbindingarvegum til Oyggjarvegin, Sunds- og Flatarvegin, Klingruvegin og við nýggju Føroya Arena.

**Lýsing av málinum**
P/F Articon hevur latið Tórshavnar kommunu tilboð um at gera hesi annleggsarbeiðir við sambandi til innkomuvegin sum heildararbeiðstøku:

- Íbindingarveg millum rundkoyringina í Marknagili og Oyggjarvegin
- Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Sundsvegin og Flatarvegin, íroknað brúgv um Hoydalsá.
- Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Klingruvegin.
- Íbindingarveg millum innkomuvegin og Føroya Arena.
- Rundkoyring á Niðarahjalla

Hesar íbindingarnar tryggja, at innkomuvegurin eisini kemur at avlasta ferðsluna lokalt í Hoyvík, á Ternuryggi og Villingardalsvegnum.

Samlaða upphæddin fyri hesar heildararbeiðstøkur er áljóðandi kr. 72.583.169,-

Íroknað hetta tilboð eru allir umrøddir íbindingarvegir, bygdir upp eftir galdandi normum. Tó eru hesir partar ikki íroknaðir:

- Slitlag (4 cm)
- Ljósmastrar og armatur

Hesi verða veitt eftirfylgjandi. Mettur kostnaður av hesum veitingum er uml. 5 mió kr.

P/F Articon upplýsir í sínum tilboðið, at arbeiðið kann verða liðugt í november 2024. Fyritøkan upplýsir, at gjaldsætlanin fyri verkætlanina er, at kr. 25.000.000,- verða goldnar í 2023 og kr. 47.583.169 í 2024.

Sostatt er tørvur á kr. 25.000.000 í 2023 og kr 48.000.000 í 2024. Tørvurin í 2023 er at rokna sum hækking av fíggjarætlanini fyri 2023.

Fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.

Fyri at gera alla verkætlanina við innkomuvegnum og íbindingarvegum lidna krevst, at tikið verður av optiónum í sáttmálanum um innkomuvegin:

1. Rundkoyring í Marknagili (optión kr. 6.171.000,-)
2. Íbinding í Marknagilsvegin (tilboð/kostnaður ikki endaligur)

Hesi arbeiði eru ikki við í hjáverandi tilboði frá P/F Articon.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 143 frá 4. november 2021 um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til mál 21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg og mál 22/01377 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03480-2 ìbindingar innkomuvegur 23-10-2023 - Rundkoyring á Niðarahjalla íroknað

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | x | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 8175 | | Innkomuvegur – íbindingar | Ja |

| Upphædd |
|---|
| 80.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 80.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 600.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Kr. 73.000.000,- verða játtaðar sum eykajáttan til heildararbeiðstøku av teimum í málslýsingini nevndu íbindingum, rundkoyringum og ferðslustýringsloysnum.
- Heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um hesar heildararbeiðstøkur innan fyri omanfyri nevndu upphædd.
- Játtaðar verða 7.000.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við heildararbeiðstøkuna.
- Omanfyri nevndu játtanir verða játtaðar sum eykajáttan og fíggjaðar við lántøku.

- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað við kr. 25.000.000 og írestandi kr. 58.000.000 verða innihildnar í fíggjarætlanini fyri 2024.
- Málið verður beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.

Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Bjørg Dam | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| Súsanna Olsen | Jón Kragesteen | Birita Baldvinsdóttir Iversen |
| | Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen | |